# BÚSKAPARRÁÐIÐ

# VÁRIÐ 2000

## Innihald

Várfrágreiðing 2000

Skjal:
Fiskidagamarknaður fyri Føroyar

Innihaldsyvirlit

Konjukturgongdin 1999 ........................................2
Yvirlit og tilmæli ........................................2
Lønargjaldingar, framleiðsla og búskaparvøkstur ........................................5
Arbeiðsmarknaðurin ........................................8
Húsaprísirnir ........................................9
Fiskiskapur og aling - prísir og nøgd ........................................10
Lønsemi í fiskivinnuni ........................................13
Skipan við fiskidøgum ........................................15
Flakavirkini ........................................17
Konjukturmeting ........................................17
Inn- og útflutningur ........................................20
Fíggjarpolitikkur, fíggjarlógin og tað almenna ........................................23

Skjal: Ein fiskidagamarknaður fyri Føroyar ........................................28
Inngangur ........................................28
Umsetiligheit ........................................29
Ognarrætturin og umsetiligheit ........................................30
Ein fiskidagamarknaður fyri Føroyar ........................................32
Nakrir eginleikar við uppskotinum um fiskidagamarknað ........................................39
Nakrir spurningar, ið eru áhugaverdir við eini skipan við fiskidagamarknaði ........................................41
Víðari útlit ........................................44
Útgangur ........................................44

# Konjukturgongdin 1999

*Búskaparráðið gevur við hesum út frágreiðingina fyri 1999. Henda frágreiðing, ið er ein uppfylging av várfrágreiðingini frá juli í fjør, er tann síðsta, sitandi Búskaparráð letur úr hondum. Talan er um viðmerkingar knýttar at dagførdum tølum fyri nøkur øki og nøkrum málum, sum hava grunnleggjandi týdning fyri føroyska búskapin.*

## Yvirlit og tilmæli

***Framvegis stórur búskaparvøkstur***

Samanlagt helt framgongdin í føroyska búskapinum fram sætta árið á rað aftan á 1993, tá kreppan leikaði á upp á tað harðasta. Á framleiðslusíðuni eru lønargjaldingarnar øktar góð 7% sammett við 1998.

Hesin vøkstur fjalir yvir eina lækking í lønargjaldingunum í fiskiskapinum uppá góð 7%, meðan lønargjaldingarnar eru øktar í hinum vinnugreinunum, serliga innan aling og fiskavirking; hetta hóast minni av fiski er komið upp á land, tí meira verður virkað.

Arbeiðsloysið minkar framvegis, og í summum vinnum eru nú tekin um fløskuhálsar. Í byggivinnuni er til dømis sera nógv virksemi, og hetta sæst aftur í húsaprísunum, sum eru hækkaðir nógv seinasta árið.

Handilsjavnin er næstan óbroyttur, við tað at innflutningsvirðið er økt við 6 %, meðan útflutningurin er øktur 4%. Prísirnir øktust við 3,4% í 1999 móti 2,6% í 1998[1]. Inflatiónin er sostatt í vøkstri .

***Niðurgongd á veg?***

Ein týðandi spurningur er, um niðurgongdin í fiskiskapinum ger, at búskapurin nú eru komin upp á toppin, og um tað nú aftur fer at ganga niðureftir. Í hesum sambandi er spurningurin eisini, um restin av búskapinum lagar seg til gongdina í fiskivinnuni, ella um hinar vinnurnar halda áfram at vaksa, soleiðis sum tær gjørdu árini undan kreppuni. Tølini fram til november 1999 góvu ikki nýggjar orsøkir til at tátta í búskaparliga, men desember lønargjaldingarnar vóru sera stórar. Um desembertølini eru brot á ta gongdina, sum var fram til november, so eigur at verða táttað í longu tíðliga í vár[2]. Orsøkin, til at hetta kann gerast neyðugt, er serliga trýstið á arbeiðsmarknaðin. Landskassin hevur stórt yvirskot, og avlopið á gjaldsjavnanum sær ikki út til at minka í mun til í fjør. Hinvegin er arbeiðsloysið sambært tølum hjá ALS nú næstan burtur. Tað er sjálvandi at fegnast um, men vandi er fyri, at fløskuhálsar eru við at taka seg upp.

[1] Hesi tøl eru roknaði við at vekta bólkaprístølini í verandi prístali við teimum vektum, sum skotið varð upp av einum arbeiðsbólki í sambandi við sáttmálasamráðingarnar millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið várið 1999.
[2] Sum nevnt í brotinum um konjunkturmeting, skulu lønargjaldingar síðst og fyrst í árinum takast við serligum fyrivarni.

***Nýggjastu tølini vísa aftur vøkstur***

Búskaparráðið hevur fyrr mett, at tann niðurgongdin, sum hevur verið í fiskiskapinum, eisini fer at gera, at niðurgongd kemur í øðrum vinnum. Hetta er enn ikki hent í nóg stóran mun (sí tó brotið um konjunkturmeting). Nýggjastu tølini – ið, sum áður nevnt enn skulu takast við ávísum fyrivarni – vísa eina enntá rættliga fitta framgongd fyri fiskiskapin. Verður hetta gongdin framyvir, kemur linkingin í búskapinum sostatt ikki, uttan so at landsstýrið ger búskaparlig inntriv. Um ikki produktiviteturin hækkar verður úrslitið fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum, lønartrýst, hækkandi prísvøkstur og versnandi kappingarføri.

***Kann gerast neyðugt við tiltøkum***

Niðanfyri eru nevnd nøkur strukturell tiltøk, sum landsstýrið undir øllum umstøðum eigur at fremja uttan mun til gongdina, men sum helst eiga at verða framskundað, soleiðis sum gongdin er í løtuni. Um vøksturin stendur við, so verður helst eisini neyðugt at útskjóta og toyggja almennar íløgur.

Í evsta føri kann gerast neyðugt við skatta- ella avgjaldshækkingum. Hetta er ein loysn, sum landsstýrið eftir ráðsins tykki, so vítt møguligt <u>ikki</u> skal nýta, tí skattatrýstið er eisini við til at skapa lønartrýst og prísvøkstur og harvið versnandi kappingarføri. Generellar skatta- og avgjaldshækkingar raka helst fyrst og fremst innflutningin, heldur enn virksemið í Føroyum, og eru tí ikki so málrættað móti at linka trýstið á arbeiðsmarknaðinum. Ein kravd pensiónsskipan hevur eisini eina tálmandi ávirkan (um hon ikki verður mótvirkað av skattalækking), men hevur eins og generellar skatta- og avgjaldshækkingar fyrst og fremst ávirkan á innflutningin. Búskaparráðið arbeiðir í løtuni við einari frágreiðing um uppskot landsstýrissins um kravda pensiónsskipan.

***Neyðugt at effektivisera almenna sektorin fyri at skapa pláss í búskapinum***

Uttan mun til um vøksturin í búskapinum stendur við ella ikki, so vísir gongdin tað farna árið, at sjálvt við lutfalsliga smáum privatum og almennum íløgum kemur føroyski arbeiðsmarknaðurin undir trýst. Neyðugt er tí at arbeiða miðvíst við at skapa pláss í búskapinum. Hetta kann gerast annaðhvørt við at skerja eftirspurningin eftir arbeiðsmegi innan almenna raksturin og/ella vinnuliga framleiðslu.

Tað almenna kann skerja sín eftirspurning við beinleiðis skerjingum ella við effektiviseringum. Hetta má gerast á skipaðan hátt, t.e. ikki við tí vælkenda ”plenuklipparaháttinum”.

Eisini innan vinnuliga framleiðslu kunnu effektiviseringar hava við sær minni eftirspurning eftir arbeiðsmegi, men landsstýrið hevur lítlar og ongar møguleikar at ávirka hesi viðurskifti uttan við at áseta hóskandi lógarkarmar.

***Fiskiflotin ikki lønsamur***

Viðvíkjandi meira langsiktaðu útlitunum hjá útflutningsvinnuni er

størsti trupulleikin, at fiskiflotin ikki er so lønsamur, at hann klárar at endurnýggja seg sjálvan. Flestu skipabólkar vinna heilt fitt av peningi í løtuni. Skuldarbyrðan er lág, men inntøkurnar eru ikki nóg stórar til at forrenta nýggj skip. Sum skjal til hesa frágreiðing er lagt eitt uppskot um fiskidagamarknað, sum ein meiriluti av Búskaparráðnum stendur aftan fyri. Eftir meirilutans tykki hevði ein slík skipan havt við sær eina munandi betran av lønseminum í fiskiflotanum.

***Flakavirkini eitt hampuligt ár***

Flakavirkini høvdu eitt hampuligt ár í fjør, og væntandi verður 1999 enn betur. Líkt er til at virkini nú betri megna at forrenta íløgur í nýggja útgerð.

***Alivinnan í stórum vøkstri***

Tað gongur væl hjá alivinnuni, men støðugt vaksandi framleiðslan krevur stóra peningabinding í íløgur. Neyðugt er tí, at alivinnan framhaldandi konsoliderar seg, so nakað er at standa ímóti við, um sjúka tekur seg upp ella prísirnir svíkja.

***Niðurstøða***

Nýggjastu tølini geva orsøk til álvarsliga at umhugsa at tátta í búskaparliga. Neyðugt er at fylgja væl við gongdini komandi tíðina, tí við verandi ferð á búskapinum, er vandi fyri, at fløskuhálsar gerast ein veruligur trupulleiki, og at inflatiónin fer at økjast.

***Tilmæli***

*Búskaparráðið hevur hesi tilmæli til búskaparpolitikkin fyri komandi tíðina:*

Tað er umráðandi, at fíggjarlógin fyri 2000 heldur alt árið.

*Strukturell tiltøk við tálmandi ávirkan, sum í øllum førum eiga at fremjast. Hesi tiltøk eiga at verða framskundað, um vøksturin stendur við:*

- MVG-lóggávan eigur at endurskoðast fyri at taka burtur undantøkini frá lógini.
- Skatta- og avgjaldspolitikkurin eigur at verða broyttur, so hann ikki stuðlar arbeiðsmegi í at flyta av landinum í eini tíð, tá mangul er upp á hesa somu arbeiðsmegi í Føroyum.
- Skattalættin hjá fiskimonnum eigur at verða avtikin, samstundis sum forboðið móti framleiðslu umborð á skipunum eigur at verða avtikið.
- Arbeitt eigur at verða víðari við at lækka rentustuðulin.
- Neyðugt er at fara undir miðvísa effektivisering og møguliga skerjing av almenna rakstrinum fyri at geva pláss í búskapinum fyri privatum virksemi og bæði almennum og privatum íløgum.

*Onnur tiltøk, um vøksturin stendur við:*

- Toygging og seinking av almennum íløgum á byggiøkinum yvir eitt longri áramál.
- Skatta- og avgjaldshækkingar (Ráðið metir tó, at landsstýrið so vítt gjørligt ikki skal nýta hetta amboð).

## Lønargjaldingar, framleiðsla og búskaparvøkstur

*Stórur vøkstur í samlaðu lønargjaldingunum…*

Uppgjørt í leypandi prísum eru samlaðu lønargjaldingarnar øktar 7,2% í ár samanborið við síðsta ár, úr 4138 mill. kr. upp í 4435 mill. kr.

*…men afturgongd í fiskiskapinum*

Henda øking fjalir útyvir eitt fall í lønargjaldingunum í fiskiskapinum uppá 7,8%. Hetta fall vísir týðiliga, at virðið á avreiðingunum er fallið, tí flestu fiskimenn verða løntir eftir hýruparti, og tí er tætt samband millum landingarvirði og lønar-gjaldingar. Í síðstu súlu í talvu 1 niðanfyri sæst, at broytingin í lønargjaldingunum í fiskiskapinum hava givið eitt negativt íkast upp á 1.5% til samlaðu broytingarnar í lønargjaldingunum í búskapinum hetta tíðarskeiðið.

Harafturímóti eru lønargjaldingarnar øktar við 14% í fiskavøru-ídnaðinum. Økingin stendst fyrst og fremst av, at minni av fiski fer óvirkaður av landinum. Hetta kemst av, at føroysku fiskavirkini eru vorðin meira kappingarfør hetta síðsta árið. Ali- og kryvjivirkini hava havt stóran vøkstur í lønargjaldingunum. Hetta kemst bæði av generelt øktum virksemi í alivinnuni í Føroyum og tí bíðað var við at taka nógv av alifiskinum í 1998 vegna lágan prís.

*Sekunderu vinnurnar og tað almenna stóran vøkstur*

Byggivinnan hevur havt rættuliga stóran vøkstur, 18% í mun til í fjør. Líkt er til, at serliga í hesi vinnuni er fløskuhálsar við at taka seg upp. Annars er rættuliga stórur vøkstur í lønargjaldingunum í sekunderu vinnuni sum heild, t.e. fyri mestan part handilsvinnan á landi. Her er vøksturin millum 7 og 18%. Postarnir almenn fyrisiting, undirvísing, heilsu- og almannaverk og posturin felagsskapir, mentan o.a. eru samanlagt vaksnir 8% og tað gevur eitt íkast til lønarvøksturin upp á sløk 3% stig. Heilsu- og almennaverki hevur økt um lønargjaldingarnar úr 480 milliónum upp í 520 milliónir, t.e. ein vøkstur upp á 9%, meðan lønargjaldingar til fólk, ið starvast innan undirvísing, eru øktar 5,5%.

***Talva 1**: Lønargjaldingar í 1.000 kr.*

| **Lønargjaldingar** | **Jan-Dec** | | | |
|---|---|---|---|---|
| | 1998 | 1999 | %broyt | %íkast |
| Landbúnaður | 4.655 | 5.491 | 18,0 | 0,0 |
| Fiskiskapur | 808.501 | 751.001 | -7,1 | -1,4 |
| Ali- og kryvjivirki | 81.933 | 110.965 | 35,4 | 0,7 |
| Ráevnisvinna | 9.300 | 11.272 | 21,2 | 0,0 |
| Fiskavøruídnaður | 271.937 | 309.092 | 13,7 | 0,9 |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 87.813 | 93.260 | 6,2 | 0,1 |
| Annað framleiðsluvirksemi | 124.014 | 146.633 | 18,2 | 0,5 |
| Bygging | 185.042 | 218.792 | 18,2 | 0,8 |
| Orku- og vatnveiting | 36.613 | 37.308 | 1,9 | 0,0 |
| Handil og umvæling | 387.255 | 427.790 | 10,5 | 1,0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Gistihús og matstovuvirki | 39.252 | 46.152 | 17,6 | 0,2 |
| Sjóflutningur | 144.160 | 164.689 | 14,2 | 0,5 |
| Flutningur annars | 76.241 | 84.208 | 10,4 | 0,2 |
| Postur og fjarskifti | 119.620 | 125.933 | 5,3 | 0,2 |
| Fígging og trygging | 206.718 | 221.901 | 7,3 | 0,4 |
| Vinnuligar tænastur | 101.831 | 111.421 | 9,4 | 0,2 |
| Húshaldstænastur | 22.936 | 25.590 | 11,6 | 0,1 |
| Almenn fyrisiting v.m. | 625.588 | 668.055 | 6,8 | 1,0 |
| Undirvísing | 225.955 | 238.314 | 5,5 | 0,3 |
| Heilsu- og almannaverk | 480.567 | 523.298 | 8,9 | 1,0 |
| Felagsskapir, mentan o.a. | 70.385 | 90.669 | 28,8 | 0,5 |
| Ótilskilað v.m. | 27.537 | 22.696 | -17,6 | -0,1 |
| **Tilsamans** | **4.137.853** | **4.434.530** | **7,2** | **7,2** |

***Kelda**: Hagstova Føroya*

***Talva 2**: Lønargjaldingar í vinnubólkum*

| **Lønargjaldingar** | **Jan-Dec** | | | |
|---|---|---|---|---|
| | 1998 | 1999 | %broyt | %íkast |
| Fiskiskapur | 808.501 | 751.001 | -7,1 | -1,4 |
| Aling og fiskavirking | 353.870 | 420.057 | 18,7 | 1,6 |
| Heimaframleiðsla | 1.545.450 | 1.720.440 | 11,3 | 4,2 |
| Almennar lønir | 1.430.032 | 1.543.032 | 7,9 | 2,7 |

***Kelda**: Hagstova Føroya*

***Lønargjaldingarnar indikator fyri BTÚ***

Av tí at eingin uppgerð er enn fyri bruttotjóðarúrtøkuna, ber ikki til at siga við vissu, hvussu stór framleiðslan er í landinum, men lønargjaldingarnar hava víst seg at vera ein góður indikator fyri, hvussu gongdin í framleiðsluni er. Ymisk fyrivarni skulu takast, men væntast kann, at lønarparturin av bruttotjóðarúrtøkuni er rættuliga konstantur. Tí kann búskaparvøksturin avlesast rættiliga neyvt av vøkstrinum í lønargjaldingunum. Rokna vit við konstantum lønarparti kunnu vit til dømis siga, at tað almenna kann metast at vera vaksið á leið líka nógv, sum restin av búskapinum higartil í ár. Tað vil so aftur siga, at tað almenna lutfalsliga hvørki er vaksið ella minkað í ár.

Sannlíkt er tó, at lønargjaldingarnar í ein ávísan mun undirmeta framgongdina í samlaðu inntøkuskapanini, tí avlopini hjá virkjunum økjast væntandi skjótari enn lønargjaldingarnar í einum hákonjukturi, meðan tað øvugta er galdandi í einum lágkonjukturi.

***Stórur vøkstur í BTÚ***

Síðan 1994 eru lønargjaldingarnar øktar 6% í meðal um árið, so í so máta víkir vøksturin í ár uppá góð 7% í nominellu brutto-tjóðarúrtøkuni ikki frá vøkstrinum seinastu árini. Men árini frammanundan vóru fyritreytirnar kanska betri fyri vøkstri, tí skattalækkingar, vaksandi fiskiskapur, hækkandi fiskaprísir,

lækkandi renta og lágir oljuprísir hava verið ein avgerandi drívmegi seinastu árini. Síðsta árið er fíggjarpolitikkurin ikki vorðin nógv slakari, og fiskivinnan hevur ikki líka góð kor, til dømis hækkaði rentan og oljuprísurin fór upp, so væntandi var, at vøksturin fór at minka. Hinvegin er sannlíkt, at privati sektorurin spardi nógv upp kreppuárini vegna stóra óvissu um framtíðina, og henda uppsparing kann væntast at minka nú tíðirnar eru vorðnar betri.

***Inflatiónin vaksandi***

Tíanverri finst einki álítandi heildarprístal, so reali vøksturin, t.e. vøksturin tá hædd er tikin fyri prísvøkstri, kann útroknast nágreiniliga. Tí er ringt at meta um, hvussu stórur partur av nominella vøkstrinum stavar frá prísvøkstri, men eingin ivi er um at virksemið er økt, t.e. at í hvussu so er ein partur av vøkstrinum er realur vøkstur. Nýtir ein tær vektir fyri nýtslubólkarnar, sum partarnir samdust um, tá ið sáttmálasamráðingar vóru millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið várið 1999, so fæst ein prísvøkstur upp á 3,4% í 1999 móti 2,6% í 1998. Inflatiónin er út frá hesi útrokning vaksandi. Umráðandi er at vera á varðhaldi næstu tíðina, tí veksur virksemið nógv aftrat upp á stutta tíð, verða lønir og prísir trýstir upp, við harav versnandi kappingarføri. Haraftrat førir hækkandi oljuprísurin til hækkandi inflatión, men hetta er innflutt inflatión, og kann ikki væntast at minka um kappingarførið, tí oljuprísurin eisini hækkar í londunum, vit kappast við.

***Tað almenna lutfalsliga minni***

Kreppuárini vaks tað almenna sum partur av samlaða búskapinum, sjálvt um almenni sektorurin minkaði hesi árini. Hetta komst av, at privatu vinnurnar minkaðu enn meira. Um vit brúka almenna lønarpartin av samlaðu lønargjaldingunum sum mát fyri lutfalsligu støddina á almenna sektorinum, vaks tað almenna hesi árini sum partur av búskapinum til at umboða umleið 37,5% av lønar-gjaldingunum frá at hava ligið um 31%. Seinastu árini er privata vinnan komin fyri seg aftur, og tí er almenni sektorurin lutfalsliga minkaður aftur til sløk 35% í 1999, sum tó framvegis er væl omanfyri støðið undan kreppuni.

***Fiskiskapurin ávirkar restina av búskapinum***

Fiskiskapurin hevur sítt egna lív so at siga, og er í vanligum árum ikki nógv ávirkaður av gongdini í restini av búskapinum. Hinvegin kann roknast við, at restin av búskapinum og serliga sekundera vinnan er ávirkað av gongdini í fiskivinnuni. Spurningurin er bert, hvussu lang tíð gongur, áðrenn broytingar í viðurskiftunum í fiskivinnuni merkjast í restini av búskapinum. Í einum sunnum búskapi hendir henda tillaging helst innan rímiliga tíð og av sær sjálvum.

Búskaparráðið hevur mett, at við bygnaðarbroytingunum, serliga avtøkuni av studnings- og veðhaldsskipanum, fer ein afturgongd skjótari at seta seg ígjøgnum, tí at truplari verður at lána seg til framhaldandi stóra nýtslu, t.e. at versnandi kredittvirði ikki longur

verður fjalt aftanfyri kredittvirðið veðhaldarans. Fram til november 1999 var niðurgongd í fiskivinnuni, meðan restin av búskapinum framvegis vaks. Haraftrat kemur, at bæði rentan og oljuprísurin eru farin upp í seinastuni. Hetta kundi væntast at minka um innlendska eftirspurningin, tí meirútreiðslurnar til rentugjaldingar og olju minka um inntøkuna, ið kann nýtast til eftirspurning, sum er virksemisskapandi í Føroyum. Men í desember 1999 eru lønar-gjaldingarnar í fiskivinnuni aftur øktar, áðrenn niðurgongdin í fiskivinnuni hevur nátt at tálma vøkstrinum í hinum sektorunum.

Vøksturin í fiskivinnuni stavar bæði frá hægri prísum og frá serstøkum viðurskiftum, so sum avrokningum av langfaraskipum við árslok. Heldur henda gongdin í fiskivinnuni fram fara heima-vinnurnar neyvan heldur at minka. Gongdin í búskapinum veldst sostatt, hvussu fiskanøgdir og –prísir verða í 2000.

## Arbeiðsmarknaðurin

***Lítið og einki arbeiðsloysi***

Arbeiðsloysið er minkað nógv seinastu árini. Í oktober vóru 861 fólk skrásett sum arbeiðsleys í ALS og svarar tað til eitt arbeiðsloysis-prosent upp á 4. Harumframt vóru 355 fólk arbeiðsleys, ið bert fáa stuðul frá Almannastovuni, og verða hesi tald við er arbeiðsloysið 6%. Ivasamt er tó, í hvønn mun hesi er tøk á arbeiðsmarknaðinum. Eftir hesum tølum at døma er arbeiðsloysið næstan burtur, og arbeiðsgevarar vísa á, at ringt er at fáa fólk frá ALS. Óivað er nakað av arbeiðsmegi tøk, sum ikki er í ALS, men nógv bendir á, at serliga fiskavirkir og handverksmeistarar hava trupulleikar við at fáa nóg mikið av arbeiðsmegi.

***Talva 3:*** *Arbeiðsloysi*

| Tøk (t.e. øll í ALS, við og uttan útgjald)(uttan fiskavirkir) | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | kvinnur | Menn | tils. | % av arb. |
| okt. 97 | 856 | 421 | 1277 | 6 |
| okt. 98 | 690 | 380 | 1070 | 5 |
| okt. 99 | 563 | 299 | 862 | 4 |

***Kelda:*** *Hagstova Føroya*

***Fólkatalið veksur framvegis***

Fólkatalið veksur framvegis. Nettotilflytingin higartil í ár er nakað størri enn somu mánaðir í fjør. Hetta kemst av stórari tilflyting í juli. Verður hesin mánaði ikki roknaður við er netto tilflytingin minni í ár enn í fjør. Búskaparliga hevur hetta týdning í sambandi við, at arbeiðsloysið stórt sæð er burtur, og at fløskuhálsar eru við at taka seg upp á nøkrum økjum á arbeiðsmarknaðinum, og harav fylgjandi vanda fyri vaksandi inflatión. Tí er tað gott fyri arbeiðsmarknaðin, at

nettoflyting er til Føroya, við tað at hetta økir um arbeiðsútboðið, og harvið linkar trýstið á lønirnar. Enn eru nógvir føroyingar, sum fluttu av landinum í kreppuárunum, búsitandi uttanlands, og tí ber til at siga, at Føroyar hava eina arbeiðskraftreservu í útlandinum. Væntast kann, at nøkur, men ikki øll, flyta aftur til Føroya tá møguleiki aftur er fyri arbeiði her í landinum. Í samband við hetta kjakið er vert at endurtaka, at tað er óheppið, at skatta- og avgjaldspolitikkurin stuðlar arbeiðsmegi í at fara av landinum at arbeiða, í eini tíð tá mangul er upp á hesa somu arbeiðsmegi í Føroyum.

## Húsaprísirnir

***Hækking í húsaprísunum…***

Nominellu sethúsaprísirnir, sum vóru hækkandi fram til 1997, vóru lutfalsliga støðugir í 1998, men eru aftur hækkaðir í ár. Skrásettu sethúsahandlarnir vísa, at í meðal, bæði fyri Suðurstreym og fyri alt landið, lá prísurin heldur lægri í 1998 enn árið fyri. Tó kom vend í í síðstu helvt av 1998, og tølini fyri 1999 vísa framhaldandi hækking í prísunum. Viðmerkjast skal, at talan er um meðalprísir fyri allar handlar av vanligum sethúsum, og hædd er ikki tikin fyri, um talan er um gomul ella nýggj hús, sum verða seld. Á myndini niðanfyri er gongdin í húsaprísunum víst.




***Kelda:*** *Føroya Sparikassi*

***…tí fleiri hava tørv á bústaði***

At døma eftir samlaða fólkatalinum átti tørvurin á sethúsum at verið minni í dag enn í 1988. Men sjálvt um fólkatalið í Suðurstreymi er nakað tað sama sum tá, er aldurssamansetingin í høvuðsstaðarøkinum broytt soleiðis, at fleiri ung eru, ið hava tørv á bústaði. Soleiðis vóru 50 nýggj sethús í Tórshavn íbundin hjá SEV í 1997, meðan talið hálvan desember í ár var 102. Roknast kann við, at bíligari lánmøguleikar, lagaliga mvg-lóggávan viðvíkjandi bygging og góðar framtíðarvánir bera framgongdina í eftirspurninginum eftir sethúsum. Rentan hevur verið søguliga lág, men er nú kvinkað uppeftir, og tað fer væntandi at vera við til at linka eftirspurningin eftir nýggjum húsum. Hartil liggur í lógini um rentustuðul, at stuðulin verður lækkaðar, og er hetta somuleiðis við til at linka eftirspurningin.

***Nógv alment byggivirksemi***

Ein partur av byggivirkseminum er umbyggingar og umvælingar v.m. Hóast tøku hagtølini ikki neyvt lýsa, hvussu virksemið er býtt millum ymiskar partar av byggivirkseminum og millum almennar og privatar byggiharrar, benda tey á, at tað almenna helst stendur fyri helvtini av øllum byggivirksemi í løtuni, og tí eisini fyri einum stórum parti av vøkstrinum í løtuni. Helst er í stóran mun talan um útsettar kommunalar íløgur, sum verða settar í verk, nú kommunurnar hava fingið betri fíggjarumstøður.

***Fløskuhálsar í byggivinnuni***

Talan hevur verið um, at í pørtum av landinum hevur í seinastuni verið trupult at fingið nóg mikið av lokalt búgvandi handverkarum. Fylgjast má væl við á hesum øki. Heldur enn at innflyta fremmanda arbeiðsmegi eigur um neyðugt at verða gjørd tiltøk til at avmarka vøksturin við t.d. at endurskoða mvg-lógina og at toyggja almennar íløgur á byggiøkinum yvir eitt longri áramál. Eisini eigur at verða umhugsað at minka uttanlandsfrádráttin í skattinum.

## Fiskiskapur og aling - prísir og nøgd

***Sama heildarveiða, men broytt samanseting***

Um hugt verður eftir føroyskari veiðu á føroyskum øki hevur fiskiskapurin sum heild verið á leið tað sama í 1999 sum í 1998. Føroysku avreiðingarnar frá veiðu á føroyskum øki vóru í fjør umleið 79 túsund tons sum er 2% minni enn árið 1998, tá heildarveiðan var góð 80 túsund tons. Tølini fjala yvir eina broyting í samansetingini av veiðuni. Serliga fiskiskapurin eftir toski er minkaður nógv, úr smáum 24 túsund tonsum niður í góð 18 túsund tons, ið svarar til eina minking upp á 22%. Í ár er triðja árið á rað, at toskafiskiskapurin minkar, úr 37 túsund tonsum í 1996 niður í eini 18500 tons fyri alt árið, tað vil siga ein helvtarminking upp á 3 ár. Hetta ávirkar sjálvandi serliga nógv rakstur og hýrur, tí toskurin er virðismiklasti fiskurin av teimum trimum týdningarmestu fiskasløgunum. Hýsuveiðan hylnast eisini verri í 1999. Góð 16 túsund tons komu upp á land í 1999, og er hetta ein minking upp á

18% í mun til í fjør. Tað er bert upsafiskiskapurin, sum royndist betur í fjør. Í fjør komu smá 30 túsund tons upp á land, og er tað ein hækking upp á 6000 tons ella 26 prosent í mun til 1998.

***Talva 4**: Føroysk veiða í føroyskum øki, botnfiskur*

| **Føroysk veiða á føroyskum øki, avreitt í Føroyum og uttanlands** | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Tons landað vekt* | | | | | | | |
| **Fiskaslag** | Januar-desember | | | | %-broyting | | |
| | 1996 | 1997 | **1998** | **1999** | 96-97 | 97-98 | 98-99 |
| Toskur | 37.348 | 33.313 | **23.783** | **18.575** | -11 | -29 | -22 |
| Hýsa | 8.550 | 15.945 | **19.770** | **16.284** | 86 | 24 | -18 |
| Brosma | 1.516 | 1.808 | **1.243** | **1.929** | 19 | -31 | 55 |
| Longa | 2.501 | 3.372 | **2.642** | **2.406** | 35 | -22 | -9 |
| Upsi | 17.356 | 19.422 | **23.419** | **29.594** | 12 | 21 | 26 |
| Hvítingur | 932 | 912 | **1.548** | **1.577** | -2 | 70 | 2 |
| Kongafiskur | 7.286 | 7.198 | **6.484** | **6.285** | -1 | -10 | -3 |
| Steinbítur | 106 | 137 | **168** | **227** | 29 | 23 | 35 |
| Blálonga | 1.029 | 908 | **980** | **1.732** | -12 | 8 | 77 |
| Rogn | 140 | 155 | **279** | **275** | 11 | 80 | -1 |
| Annað | 24 | 41 | **49** | **103** | 71 | 20 | 110 |
| **Tils.** | **76.788** | **83.211** | 80.365 | 78.987 | **8** | **-3** | **-2** |

***Kelda**: Hagstovan*

***Minkandi inntøka í fiskivinnuni***

Orsakað av broytingum í samansetingini av sløgum í fiskiskapinum, er samlaða avreiðingarvirðið minkað. Árið 1999 fall avreiðingarvirðið hjá føroyskum skipum til føroyskar fiskakeyparar 9% í mun til 1998.

***Fjøltáttaður fiskifloti***

Við nýggjastu tølunum ber til at tekna eina mynd av, hvussu árið 1999 sum heild royndist hjá fiskiflotanum. Í hesum viðfangi má hugsast um, at føroyski fiskiskipaflotin er rættiliga fjøltáttaður, og sum útgangsstøði verður tí nýtt ein uppbýting av fiskiflotanum í 4 bólkar: fiskiskapur eftir botnfiski undir Føroyum, fiskiskapur eftir pelagiskum fiski, skelja- og rækjuveiða og stóru flakatrolararnir.

***Botnfiskiskapurin slakari…***

Víðvíkjandi botnfiskiskapinum undir Føroyum var árið 1999 nakað slakari enn 1998. Tá skal havast í huga, at 1998 var eitt serstakliga gott ár, bæði til nøgd og fiskaprísir. Haraftrat vóru oljuprísirnir lágir og rentan var sera lág. Oljuprísirnir eru nú stabiliseraðir á einum hægri støði, og rentan er, sum nevnt, kvinkað uppeftir.

Toskafiskiskapurin var slakari í fjør enn í 1998. Landaða nøgdin av toski er umleið 25% minni enn í 1998. Fiskirannsóknarstovan væntar, at toskafiskiskapurin fer at minka eisini í ár, av tí at 1994-95 árgangirnir vóru so smáir. Hóast hettta verður toskastovnurin ikki mettur at vera illa fyri. 1996-97 árgangirnir verða mettir at vera góðir, og teir koma væntandi inn í fiskiskapin í 2001 og 2002.

Upsafiskiskapurin var munandi betur í fjør enn í 1998. Viðvíkjandi upsa er størri óvissa um framtíðina, tí stór ósemja er millum vinnuna og Fiskirannsóknarstovuna viðvíkjandi upsastovninum. Vinnan heldur, at upsastovnurin er væl fyri og í menning, meðan Fiskirannsóknarstovan metir upsastovnin vera uttan fyri lívfrøðiliga trygga karmin.

Hýsufiskiskapurin var nakað verri í 1999 enn í 1998, men havast má í huga, at 1998 var eitt sera gott ár til hýsufiskiskap. Hýsustovnurin verður mettur at vera rímiliga væl fyri í løtuni, so fiskiskapurin kann væntandi haldast á sama støði næsta ár.

***…men prísirnir framvegis góðir***

Ringt er altíð at meta, hvussu gongdin í fiskaprísunum verður, men møguligt er at geva nøkur kvalifiserað boð. Upsaprísurin er óvissur, men fer væntandi at halda sær ella møguliga økjast nakað. Væntandi er, at toskaprísurin fer enn longur upp, av tí at toskakvotan í Barentshavinum er skerd við 40%, sí niðanfyri. Eisini er minni til av hýsu, so væntast kann eisini, at hýsuprísurin fer nakað upp. Samanlagt verður komandi tíðin tí væntandi ikki so ring sum útlitini fyri fiskiskapinum kunnu geva orsøk til at halda, men nógv avhongur av, hvussu fiskaprísirnir fara at laga seg.

***Pelagiska veiðan verri treytir***

Fyri skipini, ið veiða pelagiskan fisk, t.e. serliga sild, makrelur, lodna og svartkjaftur, var 1998 eitt serstakliga gott ár, bæði til prís og fiskiskap. Við ársbyrjan 1999 fullu prísirnir á fiski til ídna. Til dømis fall prísurin á svartkjafti niður í ein triðing av prísunum í fjør, t.e. frá 95 oyrum fyri kilo niður í 32 oyru fyri kilo. Men síðst á árinum stabiliseraði prísurin seg á einum støði, sum er góð 60 oyru. Fiskiskapurin var heldur lakari enn í 1998, til dømis varð sildakvotan ikki uppfiskað, men sum heild kann sigast, at til fiskiskap royndist 1999 væl. Fíggjarliga úrslitið hjá pelagisku skipunum gjørdist væl verri í 1999 enn tað varð í 1998, eisini vegna verri fiskiskap, men serliga vegna prísfallið.

Pelagisku fiskastovnarnir eru væl fyri, kanska serliga svartkjaftastovnurin, so møguleiki skuldi verið fyri, at góði fiskiskapurin heldur fram. Eisini eru fleiri nýggj pelagisk skip komin inn í flotan, so veidda nøgdin verður væntandi ikki minni enn í 1998 og 1999, men kanska heldur hægri, men hetta afhongur einamest av, hvat MVL verður sett til.

***Toskafiskiskapurin í Barentshavinum minkar***

Toskastovnurin í Barentshavinum er sera illa fyri, og toskakvoturnar í Barentshavinum minka tí við 40 %, so her verður eisini niðurgongd. Hinvegin verður mett, at nakað væl av longu er til, og tí kann væntast at longukvotan hækkar. Hetta fer at hjálpa fjarflotanum, ið annars dúvar nógv upp á toskafiskiskapin í Barentshavinum. Viðmerkjast kann eisini, at útlitini fyri toskafiskiskapin við Ísland eru bjartari enn tey hava verið, men Føroyar áttu kortini bert

1150 tons av toski í íslendskum sjógvi í 1999. Kvoturnar fyri ár 2000 eru ikki avtalaður enn.

*Rækjuskipini klára seg væl*

Rækjufiskiskapurin hevur rímiliga góð útlit við tað, at rækjustovnarnir á Flemish Cap, við Eysturgrønland og við Svalbard allir síggja út til at hava tað gott, og rækjuprísurin er stabilur.

*Stór framgongd í alivinnuni*

Størsta vónin í løtuni knýtir seg til laksaalingina. Á eftirspurnings-síðuni er heimsmarknaðurin fyri laks stórur og veksur skjótt. Í 1999 vóru væntandi seld 785000 tons av laksi um allan heim, og í 2005 væntar vinnan at seld verða 1,3 milliónir tons av laksi. Føroyski parturin av hesum marknað væntast at økjast úr umleið 32 túsund tonsum í 1999 til 60 túsund tons í 2005. Um hesar forsagnir halda, verður hetta sjálvandi eitt stórt íkast til føroyska útflutningin. Ein av orsøkunum til at marknaðurin veksur so nógv er, at tað á útboðssíðuni framhaldandi ber til at lække eindarkostnaðin í framleiðsluni, um rætt verður borið at. Serliga er hetta orsakað av betri vitan og professionalismu saman við skipanini við atskildum firðum, men eisini vegna betri heilivági og nýggjari tøkni er eindarkostnaðurin fyri kilo av lidnari vøru lækkaður niður í ein triðing frá tíðarskeiðnum 1987 til 1998. Hetta hevur gjørt alivinnuna munandi betri kappingarføra við aðrar matvøruframleiðarar. Í Føroyum verður alivinnan nú rikin sera professionelt og kann tí kappast við framleiðarar aðrastaðni. Mangt bendir soleiðis á, at eindarprísurin í Føroyum er lægri einn eindarprísurin í Noregi.

Haraftrat eru alifyritøkurnar farnar at leggja seg meira eftir at koma inn á amerikanska marknaðin, sum kanska ikki hevur verið so nógv troyttur fyrr. Ein onnur orsøk er, at lond sum Noreg gera sera nógv burturúr at reklamera fyri laksi sum ein fyrsta floks matvøra, og føroysku fiskasølurnar njóta gott av at kunna liggja í kjalarvørrinum á hesum søluframtøkum.

Størsti trupulleikin í føroysku alivinnuni í løtuni er, at verandi kapitalapparat má víðkast, um marknaðarmøguleikarnir skulu troytast fult. Hetta krevur stórar íløgur, og setur harvið stór krøv til kapitalbinding. Fyritøkurnar mugu tí framhaldandi konsolidera seg fyri at hava nakað at standa ímóti við, um eitthvørt gongur galið, til dømis um sjúka aftur fer at gera um seg, ella prísirnir falla.

## Lønsemi í fiskivinnuni

*Umsetiligir fiskidagar búskaparliga betri loysn enn íløgustuðul*

Nógv hevur verið tosað um endurnýgging av fiskiflotanum. Í hesum sambandi eru tað serliga tær 40 milliónirnar, sum vóru settar av á fíggjarlógini til hetta endamál, ið hava havt áhuga. Sum skilst er samgongan vorðin samd um at strika íløgustuðulin, og vil hon ístaðin royna at gera fiskivinnuna meira búskaparliga burðardygga við at

broyta fiskidagaskipanina. Ætlanin er at gera fiskidagarnar meira umsetiligar millum allar skipabólkar, útróðrarflotan undantiknan. Búskaparráðið heldur hetta vera eina búskaparliga betri loysn enn íløgustuðul.

***Fiskiflotin arbeiðir framvegis ikki uttan studning***

Seinastu árini er beinleiðis studningurin úr landskassanum til fiskiflotan minkaður nógv. Hetta er tó ikki tað sama sum, at fiskiflotin nú arbeiðir uttan studning.

***Saneringin í nýtiárunum óbeinleiðis studningur***

Í saneringini, ið fylgdi kreppuni í 1993, varð skuldin hjá nógvum skipum niðurskrivað til eitt støði, soleiðis at skipið kundi klára seg við tí – sera vánaliga - fiskiskapi, ið var hetta árið. Henda niðurskriving varð fíggjað av landskassanum við lánum frá danska statinum, ið vórðu skotin inn í bankarnar. Hinvegin er skuldin ikki uppskrivað aftur, nú fiskiskapurin er vorðin nógv betur. Tað ber tí til at siga, at fiskiflotin í nógv ár framyvir fer at njóta gott av tí óbeinleiðis "studningi" hann fekk hetta árið, tí saneringin hevur lætt nógv um rentu- og avdráttarbyrðuna hjá fiskiflotanum.

***Ókeypis náttúrutilfeingið eisini óbeinleiðis studningur***

Til at reka vinnuligan fiskiskap krevjast 3 framleiðslufaktorar: arbeiðsmegi, kapitalapparat og náttúrutilfeingi. Vinna í fríari kapping eigur at forrenta allar tríggjar faktorarnar. Men so er ikki í fiskivinnuni. Náttúrutilfeingið – fiskidagar og kvotur - verður tilluta vinnuni ókeypis. Neyðugt er tí ikki at forrenta henda framleiðslufaktorin. Ókeypis fiskiloyvi/kvotur eru soleiðis eisini óbeinleiðis "studningur" frá samfelagnum til vinnuna. At so er sæst t.d. av, at feløg eru sinnað at gjalda privatum fyri fiskirættindi, ið hesi hava fingið ókeypis

***Studningur leggur trýst á arðar vinnur***

Fiskivinnan fær soleiðis framvegis tvey sløg av "studningi", nevniliga niðurskrivingina fyrst í nýtiárunum sum lættir um rentur og avdráttir og ókeypis atgongd til náttúrutilfeingið. Hetta elvir til yviríløgur – tí vinnan tykist meira rentabul enn hon veruliga er. Ein avleiðing av hesum er, at arbeiðsútboðið, sum restin av búskapinum skal klára seg við, verður minni, og tað kann skapa lønartrýst á landi.

***Kortini er yvirskotið ov lítið at forrenta endurnýgging***

Men hóast góða fiskiskapin og met fiskaprísinar seinastu árini og óbeinleiðis studningin frá sanering og ókeypis fiskidøgum og kvotum, er yvirskotið í vinnuni ikki nóg høgt til at forrenta nýggj skip. Búskaparráðið metir, at høvuðsorsøkin til hetta er, at fiskivinnan í dag hevur alt ov nógvar bindingar, til at hon kann innrætta seg effektivt. Gagnligt hevði t.d. verið at loyvt virking umborð og umsetiligheit av fiskidøgum. Hetta seinna skulu við viðgerða eitt sindur meira niðanfyri.

[3] Aftast í frágreiðingini er eitt dømi um, hvussu ein auktiónsskipan kundi sæð út.

*Skipan við fiskidøgum*

***Búskaparráðið gongur inn fyri størri umsetiligheit***

Seinastu tíðina hevur ein ávís almenn umrøða verið av, hvørt tað er rættvíst, at veiðurættindi, ið landið hevur latið ókeypis, verða seld við stórum vinningi. Eisini hevur tað almenna latið skipum endurgjald fyri veiðirættindi, ið sami myndugleiki upprunaliga hevur latið ókeypis. Hinvegin hevur m.o. Búskaparráðið mælt til – og gongur framvegis inn fyri - størri umsetiligheit, ið skal tryggja størri búskaparligt avkast úr fiskivinnuni, men hevur higartil ikki lagt seg út í, hvussu skipanin annars skal vera. Men tað tykist sum, at vit eru komin til eitt vegamót.

***Umsetiligheit førir til størri effektivitet***

Vert er at staðfesta beinanvegin, at uttan mun til hvussu umsetilig-heitin verður gjøgnumførd, fer hetta at hava gagnliga ávirkan á effektivitetin í vinnuni – hóast gagnliga ávirkanin kann gerast størri ella minni alt eftir, hvør leistur verður valdur. Men ávísir hættir at praktisera umsetiligheit kunnu tykjast meira í samsvar við, hvat er rætt og rímuligt.

***Umsetiligheit kann prakti-serast á ymiskan hátt***

Í grundini eru fleiri ymiskir møguleikar fyri fríðari umsetiligheit av fiskidøgum. Vit skulu serliga viðgera tvey avgerandi viðurskifti í sambandi við umsetiligheit; hvør selur og hvat ið verður selt. V.ø.o. hvør hevur ognarrættin til veiðurættindini við Føroyar, og hvussu eigur tann rættur, ið verður seldur, at síggja út. Vit hyggja her bert eftir fiskidøgum, men talan kann eins væl vera um kvotur.

***Ognarrætturin avgerðandi***

Handil við fiskidøgum kann fara á tann hátt, at verandi skip fáa loyvi at handla tillutaðar fiskidagar innanhýsis, uttan at nøkur samsýning verður latin til landskassan. Hetta er tað sum partvís fer fram í løtuni. Men møguleiki er eisini fyri, at tað almenna útbjóðar fiskidagarnar á almennum uppboði. Týdningarmikið er her, hvør hevur ognarrættin til fiskidagarnar.

Búskaparráðið er ikki samt í spurninginum. Meirilutin av Búskapar-ráðnum heldur seg til ásetingarnar í § 2, stk. 1, í Løgtingslóg nr. 28 frá 10.03.1994 v. seinni broytingum, um vinnuligan fiskiskap, har ásett verður at “*Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks*”. Eisini er staðfest í § 3 stk. 2 í somu lóg, at “*Fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rættindi til fiskiskap takast aftur uttan endurgjaldsskyldu*”. Meirilutin í Búskaparráðnum metir tí, at ein skipan eigur at vera evnað til, ið ger at Landskassin kann selja fiskidagar.

Ein minniluti, Annfinnur Olsen, metir, at vinnan hevur søguligan rætt til fiskirættindini, og tískil skal hava rætt til at keypa og selja

fiskidagar sínamillum, uttan at keypa hesar frá landskassanum fyrst. Síðani lógin um vinnuligan fiskiskap varð sett í gildi, hevur lógin virkað á henda hátt í verki. Annfinnur Olsen tekur tí ikki undir við tilmælinum hjá Búskaparráðnum, um at tað almenna skal selja fiskidagar á uppboði.

***Færri og effektivari skip***

Umsetiligheit fer væntandi at føra til færri og effektivari skip, størri yvirskot í vinnuni og miðsavnan á færri hondum[4]. Meirilutin í búskaparráðnum metir tí, at um umsetiligheit verður framd, uttan at rindað verður fyri hetta til tann, ið hevur ognarrættin til tilfeingið, merkir hetta, at tilfeingisrentan verður tilvildarliga ognað nøkrum fáum í samfelagnum. Hetta stríðir helst móti áður nevndu § 2, stk. 1, í lógini um vinnuligan fiskiskap, har ásett verður at: "*Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks*".

***Trupult hjá ungum fólki at royna seg í fiskivinnuni***

Ein annar vansi er, at trupult verður hjá ungum fólki, ið ynskir at royna fiskivinnu sum vinnuveg, at sleppa framat, tí neyðugt er at leggja sera stórar upphæddir á borðið, til tess at keypa fiskirættindi undir verandi skipan. Rættindi, ið hesi ið selja hava fingið ókeypis frá tí almenna. Hetta er neyvan í tráð við andan í lógini um vinnuligan fiskiskap, § 2 stk. 3 sum sigur: "*Ein meginregla í umsitingini av tilfeingi, ið ikki er avmarkað av altjóða- ella øðrum avtalum, sum Føroyar eru partur í, er at veita so frælsa atgongd til hetta tilfeingi sum gjørligt fyri fiskifør undir føroyskum flaggi*"[5].

***Skipanin kann koma at virka monopoliserandi og ineffektiv***

Triði vansin er, at um trupult verður at koma inn í vinnuna, kann skipanin sum frá líður koma at virka monopoliserandi og ineffektiv. Tískil er tað neyðugt at tryggja, at ein neyðug útskifting kann fara fram.

***Avgerðandi at skipanin verður fatað rættvís, fyri at skapa stabilitet og undirtøku upp á longri sikt***

Útlitini fyri stabiliteti og undirtøku fyri skipanini í verandi líki – bert við øktari umsetiligheit, eru tí ivasom upp á longri sikt, samstundis sum tað er sera umráðandi, at vinnan fær stabilar karmar at virka innanfyri. Tað letur seg bert gera við eini skipan, sum bæði verður fatað sum rættvís og effektivitetsfremjandi samstundis.

Meirilutin í Búskaparráðnum hevur í skjali givið eitt boð uppá, hvussu ein tílík skipan kann gerast, sum tryggjar effektivitet og rentabilitet í vinnuni, fríari atgongd at fiska, og sum samstundis tryggjar at ognarrættur og avkast kemur øllum Føroya fólki til góðar. Uppskotið er neyvan fullfíggjað, og ætlanin við tí er eisini bert at lýsa nøkur høvuðsprincipp, ið ein nýggj skipan kundi bygt á.

[4] Hartil kann kanska roknast við, at útlendingar í størri mun fara at luttaka við kapitali í vinnuni.
[5] Vert er her at geva gætur, at tað stendur ikki verandi fiskifør, men fiskifør undir føroyskum flaggi generelt – atlso eisini fyri fiskifør hjá føroyingum sum ynskja at royna seg í føroysku fiskivinnuni, men sum ikki frammanundan hava fiskidagar.

Uppskotið kundi soleiðis verið grundarlagið undir einum nærri útgreiningararbeiði, ið ein nevnd kundi verið sett at greitt úr hondum.

*Flakavirkini*

***Flakavirkini minni nøgd, men betri prís***

1998 var eitt munandi betur ár enn tey undanfarnu árini fyri flakavirkini, og 1999 var sannlíkt enn betur. Orsakað av minkingini í fiskiskapinum høvdu flakavirkini minni nøgd at arbeiða við í fjør enn í 1998. Men kappingarførið er batnað, og tí er útflutningurin av heilum fiski minkaður, meðan meira fiskur verður viðgjørdur, áðrenn hann fer av landinum.

Flakavirkini klára seg tí sum heild betur enn undanfarin ár, men avlopið er enn ikki nóg stórt. Fleiri orsøkir eru til hetta, men ein orsøk, sum fólk í vinnuni leggja stóran dent á, er ein meira professionellur hugburður viðvíkjandi rakstrinum. Vanliga hugsjónin hevur leingi verið, at eitt flakavirki "bara" er eitt arbeiðspláss, og tí er rakstrarúrslitið ofta komið í aðru røð. Nú verður meira dentur lagdur á, at virkini eru vinnuligar fyritøkur, sum skulu geva ílagda eginkapitalinum eitt avkast. Tí verður nú hugsað meira um at fáa størst møguligan vinning burturúr hvørjum kilo. Ein onnur orsøk til batnandi rakstrarúrslitini hjá flakavirkjunum eru rationaliseringar og betri vørukvalitetur. Eisini hava fleiri virkir skift til akkord-skipanir á flakalinjunum, sum væntandi økir produktivitetin. Samstundis er marknaðurin góður fyri hvítan fisk, og bæði enska pundið og amerikanski dollarin eru sterkir í løtuni, sum gevur ein betri prís í føroyskum krónum. Neyðugt hevur verið við nógvum smærri nýíløgum í ár, og samstundis eru lønirnar hækkaðar, men sum heild síggja virkini út til at vera før fyri at bera henda kostnað við verandi umstøðum.

## Konjukturmeting

***Er neyðugt við konjukturjavnandi tiltøkum í løtuni?***

Gongdin fram til november 1999 í teimum samlaðu lønargjaldingunum bendi á eina avhæsing av vøkstrinum í búskapinum. Avhæsingin var íkomin av einum framhaldandi falli í lønargjaldingunum í fiskiskapinum, sum fult út mótsvaraði tí framhaldandi vøkstrinum í lønarútgjaldingunum í øðrum privatum vinnum og í teimum almennum lønarútgjaldingunum. Mánaðarligi vøksturin í trendinum fyri tær samlaðu lønargjaldingarnar var, sum sæst á fyrstu myndini niðanfyri, sostatt komin nærum niður á nul. Hevði hesin trendurin hildið sær, so hevði útlit verið til lítlan og ongan vøkstur í 2000.

***Avhæsing í húsarhaldskeypi***

Henda avhæsing sæst eisini aftur aðrastaðni í búskapinum. Á næstu myndini niðanfyri sæst til dømis, at umsetningurin í

húsarhaldskeypi[6] á bygd minkaði 3. ársfj. í 1999, aftan á at vera vaksin støðugt í fleiri ár. Umsetningurin í Tórshavn tykist eisini at vera fallandi. Hinvegin so síggjast hesar umsetningsminkingar enn ikki aftur í lønarútgjaldingunum innan handil og umvæling. Roknast má tó við, at heldur henda minking fram, so fara lønargjaldingarnar innan handil og umvæling at falla fyrr ella seinni.

***Tey nýggjastu tølini vísa vøkstur***

Tey nýggjastu samlaðu lønartølini fyri desember 1999 vísa hinvegin ein so mikið stóran vøkstur – desember 1999 er 12% størri enn desember 1998 – at trendurin, sum teknaði seg í november, nú er broyttur munandi. Grundar ein metingina av 2000 á henda nýggja trendin, so eru útlit til ein vøkstur í 2000 í samlaðu lønargjaldingunum upp á knøpp 8%.

***Óvissa um lønargjaldingar við ársenda og árbyrjan***

Fyrivarni skal tó takast fyri, at lønargjaldingar upp til eitt árskifti ofta eru ávirkaðar av serstøkum viðurskiftum. T.d. kunnu avrokningarnar hjá langfarabátum ávirka tølini nógv, eins og fyritøkur av einhvørjari grund ynskja at seinka ella framskunda onkrar lønargjaldingar. Tískil er tað enn óvist, hvussu ein skal tulka tey nýggjastu desembertølini. Tað kann sostatt henda, at januartølini vera sera lág, tá tey koma.

***Tað tykist sum at vøksturin hevur tikið seg uppaftur***

Sannlíkindi má tó sigast at vera fyri, at vøkstur er komin í aftur. Tí um so var, at fallið í hýrugjaldingunum helt fram í desember, so høvdu samlaðu lønargjaldingarnar í desember 1999 kortini verið øktar við 7% í mun til desember 1998. Vøksturin í øðrum vinnum tykjast ikki at hæsa av, alivinnan er enntá í stórum vøkstri. Fiskiskapurin við Føroyar fer neyvan at falla eins nógv í 2000 og hann hevur gjørt í 1999. Sum nevnt frammanfyri í brotinum um Fiskiskap og aling verða stovnarnir av toski og hýsu ikki mettir at vera illa fyri, og væntast kann, at veiða av toski aftur fer at vaksa, tá ið nakrir góðir árgangar koma innaftur í fiskiskapin í 2001.

Viðvíkjandi fiskaprísum, so er metingin, at teir methøgu prísirnir væl kunnu halda sær í 2000. Lønargjaldingarnar í fiskiskapi kunnu tískil hugsast at gerast eins stórar í 2000 og í 1999. At tær gerast størri kann heldur ikki útilokast. Myndin kann tó koppa á, um so er at prísirnir kortini falla ella nøgdirnar minka.

Niðurstøðan er, at útlitini fyri 2000 eru rættiliga óviss. Sannlíkindi eru fyri, at tann avhæsingin, sum teknaði seg fram til november 1999, er vend til ein nýggjan vøkstur. Teir fyrstu mánaðirnir í 2000 fara helst at vísa, hvussu gongdin verður. Áðrenn hetta er greitt er trupult hjá landsstýrinum at taka støðu til, í hvønn mun tað má gera búskaparlig inntriv.

[6] Húsarhaldskeyp fevnir um matvørur, klæðir, skógvar, húsbúni, tól, umvæling, húsarhaldstænastur so sum hárfríðkan o.a., reingerðingarvirkir o.a.t.


Lønargjaldingar íalt, mánarliga
1000 kr.
500000
450000
400000
350000
300000
250000
200000
150000
100000
50000
0
1993-1
1993-4
1993-7
1993-10
1994-1
1994-4
1994-7
1994-10
1995-1
1995-4
1995-7
1995-10
1996-1
1996-4
1996-7
1996-10
1997-1
1997-4
1997-7
1997-10
1998-1
1998-4
1998-7
1998-10
1999-1
1999-4
1999-7
1999-10
rátøl
trendur


Umsetningur í húsarhaldskeypi, kvartalsliga
1000 kr.
400000
350000
300000
250000
200000
150000
100000
50000
0
1995-1 1995-2 1995-3 1995-4 1996-1 1996-2 1996-3 1996-4 1997-1 1997-2 1997-3 1997-4 1998-1 1998-2 1998-3 1998-4 1999-1 1999-2 1999-3
trendur_bygd
trendur_havn
trendur_íalt

***Kelda:** Hagstova Føroya*

## Inn- og útflutningur

***Innflutingurin øktur 6%***

Samanlagt vaks innflutningurin til Føroya 6 prosent januar til september 1999 sammett við 1998. Hetta er ikki ein stórur vøkstur, tá havt verður í huga vøksturin í lønargjaldingunum. Men tá skip verða frároknað, er vøksturin 9 prosent, og tað er á leið tað sama sum vøksturin í lønargjaldingunum. Beinleiðis nýtslan er eftir innflutningstølunum at døma ikki vaksin ógvusliga, eini 5 prosent.

***Fleiri privatar íløgur***

Innflutningur til byggivirkir og aðra framleiðslu er vaksin ávíkavist 12 og 9% og gevur hetta eitt íkast til samlaða vøksturin í innflutninginum upp á 2,6% stig. Byggivinnan hevur verið í stórum vøkstri nú í fleiri ár, og tað kemst sjálvandi av, at henda vinnan svann burtur í einki kreppuárini, so nógv byggivirksemi hevur ligið á láni. Føroysku fiskavirkini innflyta sum heild nógv minni av fiski til virkingar í ár enn í fjør. Innflutningurin av ídnaðarfiski er farin niður í ein fjórðing í mun til januar-september í 1998, og innflutningurin av feskum fiski er eisini minkaður heilt nógv. Minkingin í innflutningi av ídnaðarfiski skyldast eitt ógvusligt fall í avreiðingar-prísunum, meðan nøgdirnar eru á leið tær somu sum í fjør. Hinvegin er innflutningurin av toski frá russum á sama støði sum síðsta í 1998. Innflutningur av maskinum og aðrari útgerð er vaksin heilt nógv. Íløgur verða nú aftur gjørdar á flakavirkjunum og stóri vøksturin kundi týtt uppá, at íløguhugurin hjá øðrum vinnum á landi eisini er vaksandi.

***Talva 5**: Innflutningur í vørubólkum*

| | januar-september | | | |
|---|---|---|---|---|
| Vørubólkur | 99 | 98 | %-broyt | íkast |
| Fóður | 162.268 | 166.625 | -3 | -0,2 |
| Annað til landbúnað | 17.374 | 15.951 | 9 | 0,1 |
| Til byggivirki | 166.722 | 148.970 | 12 | 0,9 |
| Til aðra framleiðslu | 401.342 | 368.870 | 9 | 1,7 |
| Brennievni o.t. | 187.369 | 147.016 | 27 | 2,1 |
| Maskinur o.o. útgerð | 214.805 | 148.991 | 44 | 3,4 |
| Bilar | 151.986 | 113.962 | 33 | 2,0 |
| Til beinleiðis nýtslu | 597.118 | 571.281 | 5 | 1,3 |
| Vørur ikki fl. aðrast. | 32.785 | 32.690 | 0 | 0,0 |
| Skip, flogfør o.a. | 51.780 | 98.305 | -47 | -2,4 |
| Salt | 3.625 | 4.374 | -17 | 0,0 |
| Feskur fiskur | 5.445 | 19.483 | -72 | -0,7 |
| Frystur heilur fiskur | 26.655 | 32.277 | -17 | -0,3 |
| Idnadarfiskur | 15.488 | 51.251 | -70 | -1,9 |
| **Samanlagt** | **2.034.764** | **1.920.046** | **6** | **6,0** |
| **Samanl.uttan skip** | **1.982.982** | **1.821.741** | **9** | |
| **Samanl.u.skip og fisk** | **1.931.769** | **1.714.356** | **13** | |

***Kelda:*** *Hagstova Føroya*

***Útflutningurin øktur 4%***

Útflutningur Føroya vaks 4% januar-oktober 1999. Minni nøgd av óvirkaðum fiski fer av landinum, og vegna prísfall er virðið lækka enn meir, nevniliga 11%. Eisini útflutningurin av ídnaðurfiski er minkaður, heili 46 prosent. Laksur og síl eru meira enn tvífaldað bæði í nøgd og í virðið, og væntandi er hetta eitt øki sum fer at hava rættiliga stóran týdning í okkara útflutningsvinnu framyvir. Tó skal viðmerkjast, at alivinnan ikki hevur heilt so stóran týdning netto fyri gjaldsjavnan, tí alivinnan innflytir eisini nógv tilfar. Burtursæð frá saltfiskinum er tann virkaði fiskurin minkaður fitt í nøgd, men vegna hækkandi prísir er virðið ikki minkað nakað serligt, hetta er í samsvar við gjøgnumgongdina av fiskivinnuni omanfyri. Tann fjórði bólkurin, rækjur og skeljar, hevur ein hampuligan vøkstur í bæði nøgd og virði. Soleiðis sæst, at ymsu gongdirnar í teimum ymsu økjunum innanfyri fiskivinnuna samanlagt geva eina stabila gongd. Tað vil siga, at við skynsamum fiskivinnupolitikki er føroyska fiskivinnan sum heild ikki so viðkvom á tilfeingisøkinum, sum ofta verður hildið.

***Talva 6****: Útflutningur í vørubólkum*

| Vørubólkur | Virði, 1000 kr. jan - okt 1999 | 1998 | munur | % broyt | Nøgd, tons jan-okt 1999 | 1998 | munur | % broyt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ísaður og frystur fiskur | 353.543 | 398.415 | -44.872 | -11 | 45.233 | 45.624 | -391 | -1 |
| Fiskaflak, ísað og fryst | 829.531 | 923.679 | -94.148 | -10 | 29.643 | 33.194 | -3.551 | -11 |
| Saltfiskur | 371.906 | 299.509 | 72.397 | 24 | 11.217 | 9.947 | 1.270 | 13 |
| Rækjur og skeljar | 228.256 | 219.321 | 8.935 | 4 | 8.260 | 8.902 | -642 | -7 |
| Laksur og síl | 504.083 | 238.923 | 265.160 | 111 | 21.367 | 10.083 | 11.284 | 112 |
| Tilgjørdur fiskur | 36.930 | 44.464 | -7.534 | -17 | 978 | 1.337 | -359 | -27 |
| Fiskavørur til ídnað | 127.213 | 236.912 | -109.699 | -46 | 83.025 | 141.966 | -58.941 | -42 |
| Aðrar vørur uttan skip | 14.552 | 13.189 | 1.363 | 10 | 522 | 484 | 38 | 8 |
| Skip | 21.709 | 72.659 | -50.950 | -70 | 1.427 | 2.905 | -1.478 | -51 |
| **Samanlagt** | 2.500.367 | 2.456.574 | 43.793 | 2 | 201.672 | 254.442 | -52.770 | -21 |
| **Samanl.uttan skip** | 2.478.658 | 2.383.915 | 94.743 | 4 | 200.245 | 251.537 | -51.292 | -20 |
| **Saml.u.skip og aðrar** | **2.451.462** | **2.361.223** | **90.239** | **4** | **199.723** | **251.053** | **-51.330** | **-20** |

***Kelda****: Hagstova Føroya*

***Handilsjavnin versnar eitt sindur***

Handilsjavnin, sum er munurin millum útflutning og innflutning, verður væntandi um 300 milliónir fyri 1999, og er tað nakað minni enn fyri 1998. At handilsjavnin versnar í góðum tíðum er heilt vanligt, og er hetta ikki nakað stórt vandamál, í hvussu so er ikki í løtuni. Eitt stórt handilsjavnaavlop kann hinvegin ofta vera eitt tekin um, at búskapurin ikki hevur tað gott. Til dømis var yvirskotið á handilsjavnanum í 1993 umleið tvær ferðir so stórt sum tað verður í ár.

***Gjaldsjavnin***

Gjaldsjavnin er munurin millum uppsparingina í føroyska

búskapinum, og íløgur gjørdar í Føroyum. Støddina á yvir- ella undirskotinum hevur ein ávísan týdning í sær sjálvum, men tað er støddin á uppsparingini og avkastið av teim íløgum, sum verða fíggjaðar av uppsparingini, sum er avgerandi fyri, hvørjar nýtslumøguleikar føroyingar hava og fara at hava í framtíðini, og tí er tað hesi, ið dentur eigur at leggjast á.

***Gjaldsjavnin størri týdning upp á longri sikt***

Ringt er at meta um, hvussu stórur partur av eini broyting í gjaldsjavnanum er orsakað av konjukturgongdini, og hvussu nógv er orsakað av strukturbroytingum. Eingin ivi er um at størsti parturin av núverandi stóra gjaldsjavnaavlopinum stavar frá øktum fiskiskapi, hægri fiskaprísum, lágari rentu osfr. Men nógvar bygnaðarbroytingar eru framdar seinastu árini, kanska serliga avtøkan av studnings- og stuðulsskipanum, og tær eru eisini við til at betra gjaldsjavnan. Meðan tað er trupult at gera nakað við konjukturumskifti, annað enn at royna at útjavna sveiggini í búskapinum, kunnu føroyingar ávirkað í hvussu so er partar av búskaparbygnaðinum. Tað vil siga, at til ber við nýskipanum at ávirka, hvussu gjaldsjavnin í meðal yvir eitt longri áramál sær út.

***Føroyar hava ikki sjálvstøðugt gjaldoyra***

Ein eginleiki við føroyska búskaparumhvørvinum, sum ger, at gjaldsjavnin í sær sjálvum ikki hevur sama týdning í Føroyum sum í øðrum londum er, at Føroyar ikki hava sjálvstøðugt gjaldoyra. Í øðrum londum er tað oftast Tjóðbankin, sum er mest eymur um gjaldsjavnan. Hetta er ikki tí, at tey ikki vita av tí, sum greitt er frá omanfyri, men at eitt stórt gjaldsjavnahall ofta hevur við sær trýst á gjaldoyra hjá viðkomandi landi. Henda trupulleika hava vit ikki í Føroyum. Um Føroyar hava undirskot ella yvirskot á gjaldsjavnanum er líkamikið fyri donsku krónuna, tí vit viga so lítið í donsku peningaskipanini. Tí er eisini tann orsøkin til at halda eyga við gjaldsjavnanum burtur. Gjaldsjavnin er tó ein týdningarmikil indikator fyri, hvussu gongdin er í uppsparing og íløgum. Er hall á gjaldsjavnanum fleiri ár á rað, kann hetta týða uppá eina ójavnvág millum uppsparing og íløgur í samfelagnum. Tað merkir eisini at skuldin økist, og tí kann tað gerast trupult at gera nýggjar íløgur um rentablar íløgur vísa seg.

Legg til merkis, at hetta ikki er ein grundgeving fyri bara at lata alt ganga sína gongd. Heldur sigur hetta, at fokus eigur at verða flutt afturum gjaldsjavnan til teir einstøku komponentarnar.

***Týdningarmikið at hava gjaldsjavnaavlop í góðum tíðum***

Gjaldsjavnin versnaði ikki í 1999 í mun til 1998, tað vil siga, at væntandi verður yvirskotið fyri árið omanfyri eina milliard krónur. Gjaldsjavnayvirskot er í sær sjálvum ikki nakað, sum hevur stóran týdning, tí gjaldsjavnayvirskot kann fjala útyvir stórar trupulleikar í búskapinum, men í einum hákonjukturi, sum føroyski búskapurin er inni í, er týdningarmikið at hava eitt yvirskot, so búskapurin ikki kókar yvir, og samstundis fær nakað at standa ímóti við, tá tíðarnar

aftur versna.

**Fíggjarpolitikkur, fíggjarlógin og tað almenna**

***Neyðugt at halda aftur í fíggjarpolitikkinum***

Sum tað framgongur av omanfyristandandi konjunkturlýsing, so er virksemið í samfelagnum so mikið stórt í løtuni, at tað er umráðandi, at landsstýrið heldur aftur í fíggjarpolitikkinum. Arbeiðsmarknaðurin er komin at kapasitetsmarkinum, og fleiri útreiðslur og íløgur fara bert at økja um trupulleikan. Í ávísum vinnum verður nú aftur tosað um at innflyta útlendska arbeiðsmegi.

***Stórt yvirskot á fíggjarlógini***

Á fíggjarlógini fyri 1999 var roknað við einum yvirskoti upp á 245 mill. kr., men nýggjastu tølini vísa, at yvirskotið væntandi verður omanfyri 500 mill. Hetta kemst av, at skatta- og avgjaldsinntøkurnar, vegna økt virksemi í samfelagnum, verða størri enn væntað var.

Ógvuliga stórt trýst er tí á politikkarunum at játta pening til útreiðslur og íløgur, men her er avgerandi neyðugt, at teir klára at standa ímóti.

***Skattaamboðið skal nýtast við stórum fyrivarni***

Landsstýrið kann nýta bæði skatta- og avgjaldsinntøkurnar, rakstrar-útreiðslurnar og íløgurnar til konjunkturjavnan.

Skattatrýstið eigur av fleiri orsøkum at vera so javnt yvir tíð, sum gjørligt. Broytingar í skattaprosentunum hava við sær nógvar kostnaðir, sum til dømis at príssignalini verða ring at vurdera: er ein hækking í prísinum á eini vøru ein avleiðing av hægri framleiðslu-kostnaði ella er tað skattahækkingin? Generellar skatta- og avgjaldshækkingar kunnu eisini vera við til at skapa eitt lønar- og kostnaðartrýst í vinnuni. Haraftrat trívist vinnan best í einum stabilum umhvørvi, har rammurnar fyri virksemi ikki broytast ov ofta. At enda kann nevnast, at skatta- og avgjaldsbroytingar í størri mun ávirka vøruinnflutningin enn innlendis virksemið, og eru tískil ikki so vælegnaðar til minka um trýstið á arbeiðsmarknaðin.

Tí eiga skattabroytingar bert at verða nýttar í teim førum, tá onnur amboð ikki eru nóg mikið, og sjálvt tá eigur skattaamboðið at verða nýtt varisliga.

***Rakstrarútreiðslurnar ikki vælegnaðar sum konjunkturjavnandi amboð***

Landsstýrið kann eisini nýta bæði almennu rakstrarútreiðsluranr og íløgurnar sum amboð til konjukturjavnan. Tó má sigast, at rakstrar-útreiðslurnar ikki eru so væl egnaðar at verða brúktar sum konjunkturpolitisk amboð, tí tað er trupult at vaksa og minka um tær eftir tørvi. Tað tykist at vera sera lætt at hækka almennu útreiðslurnar, meðan tað er sera trupult at lækka tær. Sjálvt útreiðslur, sum nágreiniliga verða settar í verk sum tíðaravmarkað tiltøk, verða skjótt til rættindi, sum eru sera trupul at sleppa av aftur við.

Hetta merkir tó ikki, at tað ikki er sera umráðandi alsamt at meta um, hvørt almenni raksturin er so effektivur sum gjørligt, um almenni sektorurin tekst við annað enn tað, sum er neyðugt, og um tað er neyðugt at tillaga almenna sektorin eftir restini av búskapinum.

***Íløgurnar brúkast til konjunkturjavning***

Almennu íløgurnar eru betra amboðið til konjukturjavnan. Íløgur eru tíðaravmarkaðar og kunnu framskundast ella seinkast, sum tørvur er á. Somuleiðis ber rættiliga væl til at stýra, hvørt íløguvirksemið skal fremjast við føroyskari arbeiðsmegi, ella um ein ynskir at nýta innflutta arbeiðsmegi ella innfluttar vørur, fyri harvið at minka um virksemisávirkanina hjá landskassanum.

***Gott tiltak at raðfesta almennar íløgur***

Tað er eitt stig á rættari leið, at landsstýrið hevur ætlanir um at raðfesta íløgurnar í eitt áramál framyvir. Neyðugt er, at henda raðfesting verður endurskoðað hvørt ár, so hædd kann verða tikin fyri gongdini, soleiðis at møguligar umprioriteringar kunnu fara fram í góðari tíð. Tí eigur ein raðfesting av íløgunum at gerast hvørt ár, soleiðis at íløguhorisonturin altíð er tann sami. Hetta kann eisini vera við til at linka árliga trýstið á íløgurnar hjá landskassanum, um politikkarar síggja, at tær íløgur, sum teir halda eiga at fremjast, eiga tørn um nøkur ár.

***Landsstýrið sett almennan íløgukarm***

Landsstýrið er eisini sum nakað nýtt farið í samráðingar við kommunurnar um at samskipa íløguætlanirnar hjá landinum og kommununum soleiðis, at ein karmur fæst fyri samlaðu almennu íløgurnar. Hesin framferðarháttur er kendur úr eitt nú Danmark. Uppskot landsstýrissins er, at kommunali íløgukarmurin skal vera 165 milliónir krónur.

Búskaparráðið heldur, at tað er positivt, at landsstýrið hevur tikið stig til at fáa sett ein karm um samlaðu íløgurnar hjá tí almenna. Hetta er eitt amboð, sum fer at gera tað lættari at hava tamarhald á búskapinum. Hvussu víður karmurin eigur at vera, er trupult at meta um, men við verandi stóra virksemi í huga er týdningarmikið, at karmurin verður settur á eitt støði, sum ikki elvir til fleiri fløskuhálsar og harav vaksandi inflatión. Nógvar íløgur bæði almennar og privatar liggja á láni frá kreppuárunum, men tað er av avgerandi týdningi, at landsstýrið leggur eina stramma íløguætlan og klárar at standa ímóti politiska trýstinum, sum óivað verður fyri at víðka um almenna íløguvirksemið. Í tann mun íløgur verða gjørdar, mugu tær vera mótsvaraðar av ítátting í rakstrinum.

***Fíggjarlógin fyri 2000 eigur at berast saman við roknskapin fyri 1999***

Oftast hevur verið at sæð, at fíggjarlógin fyri 2000 hevur verið samanborin við fíggjarlógina fyri 1999. Skal ein meta um veruligu ávirkanina av landskassans virksemi í 2000 í mun til 1999 eigur ein tó ikki at samanbera fíggjarlóg 2000 við fíggjarlóg 1999, men heldur fíggjarlóg 2000 við roknskapin fyri 1999.

***Fíggjarlógin fyri 2000***

Ger ein tað[7], so økjast rakstrarútreiðslurnar frá 1999 til 2000 við uml. 120 milliónum krónum, herav økjast stuðul til einstaklingar við helvtini, ella 60 milliónum krónum. Frá 1998 til 1999 øktust rakstrarútreiðslurnar við 250 milliónum krónum, herav øktist stuðul til einstaklingar við uml. 30 milliónum krónum. Íløgurnar økjast í 2000 við uml. 55 milliónum krónum úr 104 milliónum krónum upp í 159 milliónir krónur. Í 1999 øktust íløgurnar við 26 milliónum krónum. Samlaðu eftirspurningsfremjandi útreiðslurnar hjá landskassanum økjast sostatt við uml. 180 milliónum krónum í 2000, meðan tær øktust við uml. 280 milliónum krónum í 1999. Talan er sostatt um ein rættiliga fitta minking í vøkstrinum frá 1999 till 2000.

***Reali vøksturin er sera lítil***

Verður hugsað um, at útreiðslurnar vegna prísvøkstur kunnu væntast at hækka við kanska 70 milliónum krónum, so verður veruligi (reali) vøksturin í landsvirkseminum ikki stórur.

***Fortreyt: ongar eykajáttanir!***

*Fortreytin fyri at kunna halda henda lága vøkstur er, at fíggjarlógin fyri 2000 ikki økist við eykajáttanum gjøgnum árið, ið annars er tað, sum vanliga hendir.*

***Ikki allar útreiðslur hava eins stóra aktivitetsávirkan***

Viðmerkjast skal eisini, at ein fullfíggjað lýsing av ávirkanini av virksemi landskassans eigur at verða grundað á, hvat slag av útreiðslum talan er um, fyri harvið at fáa eina neyva meting av ávirkanini av útreiðslunum á virksemið í samfelagnum. Eitt nú kann nevnast, at av teimum 159 milliónum krónum í íløgu í 2000 fara umleið 95 mill. kr. til bygging av vaktarskipi og nýggjari Sandoyarferju. Hesar íløgur skapa ikki nógv virksemi í Føroyum, tí tær í stóran mun verða bygdar uttanlands. Hinvegin eiga tær umleið 40 milliónirnar, ið verða nýttar til tunnilsgerð undir Vestmannasundi komandi ár at verða roknaðar uppí. Tær eru ikki við á fíggjarlógini, tí tær verða nýttar av einum almennum partafelagi, sum hevur ræðið yvir peningi, ið er vorðin játtaður av landskassanum.

***Lítil virksemisávirkan av inntøkum landskassans***

Skatta- og avgjaldsinntøkurnar hjá landskassanum eru ætlaðar til 2.330 milliónir krónur í 2000. Í 1999 vóru tær 2390 milliónir krónur og í 1998 2133 milliónir krónur. Avlopið hjá landskassanum ætlast til 445 milliónir krónur í 2000 móti 520 milliónum krónum í 1999 og 467 milliónum krónum í 1998[8]. Ofta verður sagt, at eitt vaksandi avlop hjá almennu kassunum merkir eina fíggjarpolitiska ítátting, meðan eitt minkandi avlop hinvegin merkir ein linari fíggjarpolitikk. Avlopið hjá landskassanum kundi tískil bent á eina størri virksemis-ávirkan av landskassanum í 2000 enn í 1999. Tær skiftandi inntøkurnar hjá landskassanum stava tó ikki frá broyttum avgjaldsstigum ellar broyttum skattastigum, men fyrst og fremst frá broyttum virksemi í samfelagnum (umframt eitt nú skiftandi

[7] Fyribilsroknskapartøl pr. 20. januar 2000 frá Fíggjarmálastýrinum. Tølini skulu lesast við neyðugum fyrivarni.
[8] Skuldareftirgevinging frá danska statinum upp á 900 milliónir krónur er ikki íroknað.

inntøkum frá Føroya Banka). Tí metir Búskaparráðið ikki, at tað er rætt at grunda metingar um ávirkan landskassans á virksemið í samfelagnum á gongdina í avlopinum. Høvdu skatta- og avgjaldsstigini hinvegin verið broytt, so hevði ávirkanin av hesum broytingum á virksemið skulað verið tikin við í metingina. Gongdin í skatta- og avgjaldsinntøkum landskassans og avlopinum hava kortini tann áhuga, at tað sigur nakað um teir sonevndu automatisku stabilisatorarnar. Tí høvdu inntøkurnar og eitt nú almannaveitingar vegna t.d. arbeiðsloysi ikki broytst við broyttum virksemi, so hevði virksemið í samfelagnum broytt seg uppaftur meira, t.e. vit høvdu fingið størri sveiggj í búskapargongdini, um almennu kassarnir ikki tóku inn skattir og rindaðu veitingar.

***Aðrir almennir kassar***

Umframt landskassans virksemið eigur virksemið hjá kommununum, ALS o.ø. at verða tikið við, áðrenn enn ein kann meta um, hvussu almenni sektorin ávirkar samfelagsvirksemið. Tíverri er hetta ikki gjørt í hesari frágreiðing. Ein meting er, at fleiri kommunur lækka síni skattaprosent, samstundis sum tær royna at økja um útreiðslurnar bæði til rakstur og íløgur. Sum nevnt hevur landsstýrið tó spælt út við einum íløgukarmi fyri at tálma virkseminum. Arbeiðsloysis-skipanin, ALS, lækkar eisini síni gjøld í 2000, og fær hetta eisini eina ávirkan í eftirspurningin í samfelagnum. Samanlagt er virksemisávirkanin av kommunalu kassunum og ALS helst økt meira enn landskassans ávirkan er økt.

***Ikki neyðugt við tiltøkum, um vøksturin er avhæsaður***

Ráðið metir, at undir tí fortreyt, at fíggjarlógarin fyri 2000 verður hildin, so er økingin í virksemisávirkanin av landsvirkseminum lítið størri enn hon var í 1999. Tann gongdin, sum var í virkseminum í búskapinum, fram til november 1999, bendi á at vøksturin var við at hæsa av. Um hetta vísir seg at halda, tá ið teir fyrstu mánaðirnir í 2000 eru farnir aftur um bak, so verður neyvan neyðugt við tiltøkum.

***Neyðugt at framskunda tiltøk, um vøksturin stendur við***

Hinvegin benda desemberlønarútgjaldingarnar – ið skulu nýtast við fyrivarni – á, at vøksturin stendur við ella økist. Verður hetta gongdin hesar fyrstu mánaðarnar í 2000, so gerst neyðugt hjá landsstýrinum, at framskunda tiltøk, sum Búskaparráðið fyrr hevur víst á eiga at verða framd undir øllum umstøðum. Hesi tiltøk eru meira av strukturellum slagi, men hava eisini eina ítáttandi ávirkan.

Talan er um, at taka burtur undantøkini í mvg-lóggávuni, taka burtur uttanlandsfrádráttin í skattinum og at taka burtur skattalættan hjá fiskimonnum.

***Kanska neyðugt at toyggja íløgur ella møguliga hækka skatt***

Er hetta ikki nóg mikið, so verður neyðugt við øðrum tiltøkum. Í fystu atløgu kann gerast neyðugt at útseta og toyggja íløgur. Tað kann eisini koma upp á tal, at hækka skattir ella avgjøld, men sum omanfyri nevnt, so heldur Búskaparráðið ikki at hetta amboð eigur at verða nýtt uttan hægst neyðugt.

Orsakað av, at nærum alt lá stilt undir kreppuni, eru nógvar íløgur neyðugar fyri at byggja uppaftur tað, sum er niðurslitið, og tørvur er altíð á nýíløgum fyri at betra um infrastrukturin. Tað sama er galdandi fyri privatar íløgur.

***Neyðugt at effektivisera almenna raksturin fyri at skapa pláss í búskapinum fyri neyðugum íløgum.***

Búskaparráðið ásannar, at tað er ein trupulleiki, at tað er neyðugt at vera so afturhaldandi við almennu íløgunum, samstundis sum tørvur er á nógvum ábótum og endurnýggingum. Tað er tó av alstórum týdningi, at búskapurin ikki verður yvirupphitaður.

Gongdin hesi seinastu árini hevur víst, at sjálvt við lutfalsliga lágum íløgum, bæði almennum og privatum, so verður trýstið á arbeiðsmarknaðin ov stórt. Uttan mun til um vøksturin í búskapinum heldur fram ella ikki, verður tí alneyðugt á onkran hátt at skapa pláss í búskapinum fyri hesum íløgum. Hetta kann gerast við effektiviseringum bæði innan tað almenna og í vinnuni. Harvið verður eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi minni. Landsstýrið hevur ikki so stórar møguleikar fyri at ávirka effektivitetin í vinnuni uttan at skapa hóskandi lógarkarmar, men kann fyrst og fremst ávirka sín egna rakstur.

Ein miðvís effektivisering og møgulig skerjing av almenna sektorin eigur ikki at gerast við ”plenuklipparanum”, men út frá gjølligum metingum av almenna bygnaðinum, og um hvat virksemi kann effektiviserast, og hvat virksemi er neyðugt ella ikki er neyðugt.

Broytingarnar av  bygnaðinum í miðfyrsitingini hesi seinastu árini eru fyri ein part grundaðar á ynski um at effektivisera. Tað er tó kortini ivasamt, um hetta hevur havt við sær stórvegis rationaliseringar. Dømi eru um alment virksemi, eitt nú almennir útlánsgrunnar, sum tann privati sektorin í fullan mun kann røkja sjálvur. Slíkt virksemi er upplagt at leggja niður í almennum høpi. Ein háttur á koma víðari hevði eisini verið, um almennar tænastur í størri mun høvdu verið útlisiteraðar. So hevði marknaðurin verið við til at avgjørt, hvørt tørvur er á hesum tænastum, eins og tillagingin hevði verið smidligari.

## Skjal: Ein fiskidagamarknaður fyri Føroyar

*Eitt uppskot um umskipan av føroysku fiskidagaskipanini, til tess at skapa samljóð millum fulla umsetiligheit av fiskidøgum og ásetingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap*

**Inngangur**

***Vinna í fríari kapping eigur at forrenta allar 3 framleiðslufaktorar***

Til at reka vinnuligan fiskiskap krevjast 3 framleiðslufaktorar: arbeiðsmegi, kapitalapparat og náttúrutilfeingi. Vinna í fríari kapping forrentar vanliga allar tríggjar faktorarnar. Men so er ikki í fiskivinnuni. Náttúrutilfeingið – fiskidagar og kvotur - verður tillutað vinnuni ókeypis. Neyðugt er tí ikki at forrenta henda framleiðslufaktorin. Ókeypis fiskiloyvi/kvotur eru soleiðis óbeinleiðis studningur frá samfelagnum til vinnuna. At so er sæst t.d. av, at feløg eru sinnað at gjalda privatum fyri fiskirættindi. Hesin partur av fiskivinnuni ið keypur, er sostatt tann einasti, ið rindar fyri náttúrutilfeingið.

Seinastu tíðina hevur ein ávís almenn umrøða verið av, hvørt tað er rímuligt, at veiðurættindi, ið landið hevur latið ókeypis, verða seld við stórum vinningi. Hetta hóast tað er staðfest í § 2, stk. 1, í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap[9], at:

"*Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks*".

***Umsetiligheit undir verandi skipan kann geva trupulleikar***

Ætlanir eru í løtuni frammi um at loyva fría umsetiligheit av fiskiloyvum. Men umsetiligheit undir verandi skipan óbroyttari er helst ikki uttan trupulleikar. T.d. verður trupult hjá ungum fólki, ið ynskir at royna fiskivinnu sum vinnuveg at sleppa framat, tí neyðugt er at leggja sera stórar upphæddir á borðið[10], til tess at keypa fiskirættindi undir verandi skipan. Rættindi, ið seljarin hevur fingið ókeypis frá tí almenna. Hetta er neyvan heldur í andanum í lógini um vinnuligan fiskiskap, § 2 stk. 3 sum sigur:

"*Ein meginregla í umsitingini av tilfeingi, ið ikki er avmarkað av altjóða- ella øðrum avtalum, sum Føroyar eru partur í, er at veita so frælsa atgongd til hetta tilfeingi sum gjørligt fyri fiskifør undir*

[9] Løgtingslóg nr. 28 frá 10.03.1994 v. seinni broytingum.
[10] Føroysku royndirnar higartil vísa, at fiskiloyvið ofta verður selt fyri 5-6 ferðir virðið av skipinum og í Íslandi eru royndirnar, at fiskiloyvi ofta verða seld fyri tíggjutals milliónir føroyskar krónur.

*føroyskum flaggi*"[11].

Um trupult verður at koma inn í vinnuna, kann skipanin sum frá líður koma at virka monopoliserandi og ineffektiv. Tískil er tað neyðugt at tryggja, at ein neyðug útskifting kann fara fram.

***Búskaparráðið tekur undir við umsetiligheit***

Búskaparráðið hevur m.o. mælt til – og gongur framvegis inn fyri - størri umsetiligheit, ið skal tryggja størri búskaparligt avkast úr fiskivinnuni, men hevur higartil ikki lagt seg út í, hvussu skipanin annars skal vera. Men tað tykist sum, at vit eru komin til eitt vegamót. Útlitini fyri stabiliteti og undirtøku fyri skipanini í verandi líki – bert við øktari umsetiligheit, eru ivasom upp á longri sikt, samstundis sum tað er sera umráðandi, at vinnan fær stabilar karmar at virka innanfyri. Tað letur seg bert gera við eini skipan, sum bæði verður fatað sum rættvís og effektivitetsfremjandi samstundis.

Við hesum ynskir Búskaparráðið at geva eitt boð uppá, hvussu ein skipan við umsetiligheit kann gerast, sum tryggjar effektivitet og rentabilitet í vinnuni, fríari atgongd at fiska og samstundis tryggjar, at ognarrættur og avkast kemur øllum Føroya fólki til góðar. Uppskotið er neyvan fullfíggjað, og ætlanin við tí er eisini bert at lýsa nøkur høvuðsprincipp, ið ein nýggj skipan kann byggja á. Uppskotið kundi soleiðis verið grundarlagið undir einum nærri útgreiningararbeiði, ið ein nevnd kundi verið sett at greitt úr hondum[12].

## Umsetiligheit

***Vinnan og politiska valdið taka undir við umsetiligheit***

Tað skilst, at stórir partar av vinnuni og politiska valdinum taka undir við umsetiligheit[13]. Hetta merkir, at tikið verður undir við, at loyvt skal vera at keypa og selja fiskirættindi. Men harvið er ikki vist, at øll hava somu fatan av, hvør kann selja hvørjum.

***Avmerkingar til frama fyri vinnuna***

Upprunaliga høvdu allir føroyingar rætt til at reka fiskiskap. Men so hvørt veiðutrýstið øktist og leiðirnar trongdust, gjørdist fiskur eitt avmarkað tilfeingi. Frá yvirskipan í hagum kenna føroyingar til avleiðingarnar av at loyva óavmarkaða roynd av einum avmarkaðum tilfeingi. Úrslitið er at øll fáa minni, enn um seyðaskipanin var avmarkað í mun til tilfeingið. Soleiðis er eisini við fiskiskapi. Veiðu-

[11] Vert er her at geva gætur, at tað stendur ikki verandi fiskifør, men fiskifør undir føroyskum flaggi sum so. Hetta merkir helst eisini fiskifør hjá føroyingum sum ynskja at royna seg í føroysku fiskivinnuni, men sum ikki frammanundan hava fiskidagar.

[12] Sjónarmiðini sum vera sett fram í hesum skjali eru sjónarmiðini hjá einum meiriluta av Búskaparráðnum. Minnilutin, Annfinn Olsen, tekur ikki undir við hesum sjónarmiðum. Hann metir, at tað eru tey ið eru í vinnu í løtuni, sum skulu hava rætt at selja teirra rættindi til onnur. Tann, ið skal koma inn í fiskivinnuna, má kompensera teimum, ið leggja vinnuna niður.

[13] Føroya Fiskimannafelag hevur tó tikið ávís fyrivarni.

trýstið má avmarkast eftir tilfeinginum, til tess at fáa sum frægast burturúr búskaparliga. Tískil eru avmarkingarnar serliga til gagns fyri tey, ið sleppa at troyta tilfeingið framíhjá, og harvið fáa meira burturúr, enn um talan var um frían fiskiskap. Neyvan nakar í fiskivinnuni gongur inn fyri fullkomuliga fríum fiskiskapi[14].

***Tilfeingið er ogn Føroya fólks***

Men hvør skal so sleppa at troyta tilfeingið í havinum? Í § 2, stk. 1, í lógini um vinnuligan fiskiskap, er sum nevnt ásett at "*Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks*". Í roynd og veru kunnu vit siga, at lógin um vinnuligan fiskiskap skal tulkast soleiðis, at um tað t.d. eru 45 tús. fiskidagar til taks, hevur hvør føroyingur ognarrætt til 1 fiskidag. Men at geva hvørjum føroyingi 1 fiskidag at royna er ikki búskaparliga effektivt. Tilfeingið í havinum hevði ikki verið nøktandi gagnnýtt.

***Mest fæst burturúr undir marknaðartreytum***

Av søguligum orsøkum, vóru hesir dagar "læntir" teimum, ið virkaðu í vinnuni tá lógin var sett í gildi, fyri 10 ár í senn. Men søguliga býti tryggjar ikki av sær sjálvum størsta samfelagsliga avkastið av tilfeinginum í havinum. Eins og galdandi er fyri flest øll onnur avmarkaði tilfeingi, fæst størst trygd fyri, at sum mest fæst burturúr teimum, um tey kunnu handlast á einum marknaði. Harvið verður tryggjað, at tann, ið er mest effektivur búskaparliga, verður tann, ið nýtir rættindini.

Men til tess at hava umsetiligheit er neyðugt fyrst at áseta, hvør kann selja og keypa, og hvat skal seljast. Vit skulu fyrst hyggja at, hvør skal kunna selja og keypa. Grundleggjandi spurningurin her er ognarrætturin.

### Ognarrætturin og umsetiligheit

Tann føroyingur, ið ætlar at byrja fiskivinnu av nýggjum, ella økja um verandi virksemi, má undir eini skipan við umsetiligheit keypa sær rættin til at fiska. Hetta er helst semja um. Men spurningurin er, hvørjum viðkomandi skal rinda fyri henda rætt? Í grundini eru tveir møguleikar fyri fríari umsetiligheit av eitt nú fiskidøgum. Annar er, at verandi skip fáa loyvi at handla tillutaðar fiskidagar innanhýsis, uttan at nøkur samsýning verður latin til landskassan. Hetta er tað, sum partvíst fer fram í løtuni. Hin er, at tað almenna útbjóðar fiskidagarnar á almennum uppboði.

[14] Helst eru nógv í fiskivinnuni, ið fata støðuna ørðvísi. Fyrst komu fiskimarksavmarkingarnar, síðani avmarkingar at leggja um millum ávísar veiðuhættir, avmarkingar fyri at fáa fisk til virkingar á landi osfr. Tí kann kanska vera trupult at síggja hesar avmarkingar sum verandi til gagns fyri fiskivinnuna. Men um fiskiskapur varð givin fullkomuliga leysur aftur er lítið at ivast í, at veiðuflotin hevði verið munandi verri fyri.

Út frá ásetingunum í lógini um vinnuligan fiskiskap er nærliggjandi at koma til ta niðurstøðu, at av tí at tilfeingið undir Føroyum er ogn Føroya fólks, má viðkomandi keypa rættindini frá felags kassa Føroya fólks, nevniliga landskassanum[15]. Hetta framgongur bæði av § 2, stk. 1, í lógini um vinnuligan fiskiskap, har staðfest er at ognarrætturin er "*Føroya fólks*" (jvb. frammanfyri) og av § 3 stk. 2 í somu lóg, ið staðfestir at:

"*Fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rættindi til fiskiskap takast aftur uttan endurgjaldsskyldu*".

***Oljuríkidømið verður ikki latið ókeypis***

Tað rímuliga í, at landskassin selur veiðurættindi, sæst einabest av, at fiskiríkidømið er at javntseta við t.d. olju- og miniralríkidømi í undirgrundini. Neyvan nakar hevði gingið inn fyri at latið hesi ríkidømi at troyta ókeypis til oljufeløg. Somuleiðis er við fiskiríkidøminum. Umsetiligheitin fer væntandi at føra til færri og effektivari skip, størri yvirskot í vinnuni og miðsavnan á færri hondum[16]. Ein kann tí siga, at tilfeingisrentan, um umsetiligheit verður framd undir verandi skipan óbroyttari, verður tilvildarliga ognað nøkrum fáum í samfelagnum[17].

***Uttan mun til skipan má framtíðar føroyingurin rinda fyri fiskirættindi***

Ein annar háttur at síggja hetta er, at hugsa sær støðuna um t.d. 50 ár, tá eitt nýtt ættarlið er komið fyri tey, sum í dag eru virkin innan fiskivinnu. Gangast má út frá, at hóast tey, sum í dag eru virkin, møguliga kunnu vinna sær søgulig rættindi, kunnu hesi rættindi neyvan arvast; í hvussu so er ikki innan karmarnar av lógini um vinnuligan fiskiskap[18]. Tískil kunnu tey, sum tá virka í fiskivinnuni, bert koma framat við at keypa sær rættindi! Sostatt má sigast, at um hugt verður nóg langt fram, so verður øll vinnan at hava rinda fyri rættindini; hetta uttan mun til um tað er landskassin ella verandi vinna, ið fær rættin at selja fiskirættindi.

***Skulu tey, sum longu eru í vinnuni, sleppa undan at rinda?***

Tey, ið taka undir við umsetiligheit undir galdandi skipan, taka samstundis undir við, at tað er rímuligt, at tey, ið byrja fiskivinnu skulu rinda fyri tað, eins og tey góðtaka, at tey, ið longu eru í vinnuni mugu rinda fyri hesi rættindi, um tey ætla at víðka um virksemið. Hetta er ein beinleiðis avleiðing, um ein gongur inn fyri umsetiligheit undir galdandi skipan. Spurningurin, sum stendur eftir, er tí einans: skulu tey sum eru í vinnuni í løtuni, og ætla at halda fram, sjálvi rinda fyri verandi rættindi framyvir?

[15] Í grundini kundi hugsast, um ein marknaður var fyri fiskidagar, at hvør føroyingur kundi selt sínar fiskidagar á uppboði. Men av praktiskum orsøkum er ivaleyst skilabetri, at landið selur allar fiskidagar á uppboði. Hetta merkir, at ágóðin fer í landskassan og harvið verður til gagns fyri allar landsins borgarar.

[16] Hartil kann kanska roknast við, at útlendingar í størri mun fara at luttaka við kapitali í vinnuni.

[17] Hetta stríðir helst eisini móti § 2, stk. 1, í lógini um vinnuligan fiskiskap.

[18] Tað løgna í lógini um vinnuligan fiskiskap er, at arvurin gongur frá skipi til skip og ikki frá persóni til persón. Skipið fær harvið ein serstakan status; ikki sum eitt amboð at fiska við, men sum ein sjálvstøðug vera, við sínum egna tilverugrundarlagi.

***Øll mugu vera "líka fyri lógini"***

Havandi í huga, at avmarkingarnar og umsetiligheitin skulu tryggja effektivari rakstur, og harvið munandi størri avlop í vinnuni, og hetta kemur teimum, sum eru í vinnuni til góðar, er torført at síggja nakað skeivt í, at tey sum fáa hesi avmarkaðu rættindi, sum øll føroya fólk eiga, skulu rinda fyri at varðveita henda framíhjárætt[19]. Tað er helst eisini betonkiligt at gera mun á ymiskum pørtum av somu vinnu, við at nøkur fáa fiskidagarnar ókeypis, – her tey, sum longu eru í vinnuni, meðan tey ið framyvir taka upp fiskivinnu mugu gjalda, so hesi so at siga “ikki eru líka fyri lógini”.

Men verður avgjørt, at nøkur varðveita fiskiloyvið uttan at rinda fyri tað, má ognarrætturin verða latin teimum samstundis, so tey kunnu selja hesi rættindi. Um ikki, verður hesin parturin av fiskivinnuni læstur fastur í verandi bygnaði, tí ongin vil sjálvboðin lata av hondum ókeypis rættindi. Hetta vildi verið ein búskaparliga sera óheppin loysn[20].

***Neyvan grundarlag fyri endurgjaldi***

Ein annar spurningur er, um tey sum fara úr vinnuni eiga at fáa part av søluni av veiðurættindum sum endurgjald fyri at leggja virksemið niður? Ein løgfrøðilig meginregla er, at til tess at hava krav uppá endurgjald, er neyðugt at staðfesta eitt tap, sum tann, ið verður kravdur eftir endurgjaldi, er orsøk til. Tann, ið virkar í fiskivinnuni í dag, ger íløgur í tiltrúgv til ta skipan vit hava. Verður ein nýggj skipan sett í staðin fyri verandi, kunnu fortreytirnar fyri longu gjørdum íløgum broytast, so tap stendst av hesum. Men tá onki er goldið fyri rættindini og fortreytirnar eru greitt ásettar í lógini um vinnuligan fiskiskap, jvb. § 2 stk. 1 og § 3 stk. 2, og tá viðkomandi stendur frítt at halda fram við fiskiskapi við sama ella øðrum skipi undir nýggju skipanini, har møguleiki er at keypa rættindi á jøvnum føti við allar aðrar føroyingar, er helst ivasamt um grundarlag er fyri endurgjaldi. Men hetta er ein partvís løgfrøðiligur, partvís politiskur spurningur.

**Ein fiskidagamarknaður fyri Føroyar**

***Fiskidagaskipanin er grundarlagið***

Vit taka støði í verandi fiskidagaskipan, sum eins og higartil skal hava stovnsrøkt sum endamál.

Fyrst er helst rætt at gera hugtøkini greið. Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, letur Landsstýri tvey sløg av rættindum, nevniliga **veiðuloyvi** og **fiskiloyvi**. Sambært § 5 stk. 3 er veiðuloyvi:

[19] Hinvegin er neyðugt, at so fáar avmarkingar í møguleikunum at virka verða, so grundarlag verður fyri effektivari rakstri. Avmarkingar eiga ikki at vera fyri talinum av skipum, fyri skipastøddum ella veiðuhættum og loyvt eigur at vera at virka fisk umborð á skipum .

[20] Havast skal í huga, at verður ognarrætturin latin privatum, so er hetta ein irreversibul process. Tað ber ikki til at draga ognarrættin inn aftur seinni, um skipanin ikki virkar sum ætlað. Skipanin við fiskidagamarknaði hevur ikki henda vansa.

"*…góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar*".

Sambært § 5 stk. 4 er fiskiloyvi:

"*…tann rættur, sum landsstýrismaðurin hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðuloyvi sambært stk. 3, soleiðis at veitt verða fyribils ella avmarkað rættindir at veiða ávísa nøgd/dagatal úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári*".

Av tí at veiðuloyvið kann javnmetast við eina løggilding av einum flakavirki – altso eitt slag av góðkenning av einum skipi til fiskiskap – er hetta loyvið ikki egnað til umsetiligheit. Tá tosað verður um umsetiligheit, verður tí hugsað um umsetiligheit av teimum rættindum, ið knýta seg til fiskiloyvir, t.e. teir fiskidagar ella tær kvotur, ið eru tengdar at núverandi fiskiloyvum. Vit viðgera bert fiskidagar í hesum uppskotinum, hóast talan eins væl kundi verið um stutttíðarkvotur; t.e. rættin til at fiska eitt ávíst tonsatal av ávísum fiskaslagi í einum avmarkaðum tíðarskeiði[21].

***Eindarfiskidagar***

Vit hugsa okkum, at á hvørjum ári skal framhaldandi ásetast, út frá lívfrøðiligu fortreytunum, hvussu nógvir *eindar*fiskidagar kunnu fiskast. *Eindarfiskidagarnir skulu ikki vera tengdir at skipum*, men vera frítt umsetiligir millum føroyingar á einum fiskidagamarknaði.

Lat okkum definera ein eindarfiskidag sum rættin at fiska ein fiskidag, í einum ávísum tíðarskeiði, við einum ávísum veiðutrýsti – t.d. svarandi til veiðutrýstið hjá einum línubáti av ávísari stødd. Tíðarskeiðið kann t.d. vera januar 2000, 1. ársfjórðingur 2000, 1. Hálvár 2000 osfr.

Hesin rættur svarar í búskaparteori til eina sokallaða "amerikanska optión", sum er rætturin, men ikki skyldan, at keypa/selja/brúka eitt ávíst tilfeingi í einum avmarkaðum tíðarskeiði. Rætturin kann nýtast nær tað skal vera í tíðarskeiðinum. Verður hesin rættur ikki nýttur, dettur hann burtur tá tíðarskeiðið er runnið. V.ø.o. er fiskidagurin ikki brúktur í tíðarskeiðinum, dettur hann burtur uttan nakað endurgjald. Hinvegin er møguleiki hjá teimum, ið hava keypt dagar, ið tørvur ikki er á og sum ikki eru dotnir burtur, at selja hesar víðari til onnur í tíðarskeiðinum[22].

***Tíðarskeiðið eigur at vera so stutt sum gjørligt***

Ein av trupulleikunum við verandi skipan við fiskidøgum er, at hesir eru galdandi í upp til 10 ár í senn. Tvørturímóti tí ein ofta hoyrir, so økist óvissan við longdini av fiskirættindunum, tá hesi eru

[21] Eins og talan eins væl kann vera um nær, mið og fjarleiðir.
[22] Hetta kann vera aktuelt í fleiri førum. Eitt nú um skipið fær maskinbrek, ella veiðumynstrið broytist í einum tíðarskeiði, so onnur skip kunnu fáa meira gagn av fiskidøgunum.

umsetilig[23]. Og hetta uttan mun til, hvørt tað eru privat ella landskassin, ið selur tey. Orsøkin er, at sera trupult er at meta um búskaparligu útlitini fyri fiskiskapi so langt fram. Prísurin á einum tilíkum rætti eigur at ásetast sum nútíðarvirðið av tí væntaða avkasti, ið hesin rættur gevur yvir ta tíð, hann er galdandi. Forvæntaða avkastið er aftur tengt at vánunum fyri fiskiskap, prísum, hvussu manningarsáttmálarnir koma at síggja út, rentum, tøkniligari menning í fiskivinnuni, kapping osfr. Tískil er ógjørligt at siga frammanundan, hvørt talan verður um ein sera góðan ella sera vánaligan handil. Ein kann hugsa sær óvissuna, um føroysk skip fingu álagt, at keypt olju fyri 10 ár í senn. Jú styttri tíðarskeið, ið neyðugt er at keypa fyri, jú minni óvissa, tí prísurin á fiskidøgum kemur at hækka og lækka alt eftir, hvussu búskaparligu umstøðurnar í fiskivinnuni eru. Harvið verður tað í størri mun seljarin, t.e. landskassin, ið ber fíggjarliga váðan, og ikki keyparin.

Styttri tíðarskeið gera tað harnæst léttari hjá ungum fólki, ið ynskir at royna fiskivinnu sum vinnuveg, at sleppa framat, tí neyðugt er ikki at leggja sera stórar upphæddir á borðið, til tess at keypa fiskirættindi, eins og undir verandi skipan. Við at definera fiskidagarnar sum omanfyri, verður tískil léttari at koma inn í fiskivinnuna. Hetta tryggjar kapping og neyðuga útskifting, so skipanin sum frá líður ikki kemur at virka monopoliserandi og ineffektiv. Eisini er hetta meira í tráð við andan í lógini um vinnuligan fiskiskap, § 2 stk. 3 sum sigur "*Ein meginregla í umsitingini av tilfeingi, ið ikki er avmarkað av altjóða- ella øðrum avtalum, sum Føroyar eru partur í, er at veita so frælsa atgongd til hetta tilfeingi sum gjørligt fyri fiskifør undir føroyskum flaggi*"[2].

Sum áður nevnt kundi skipanin eins væl bygt á stutttíðarkvotur.

***Innari og ytri leiðir***

Hugsast kann, at skilagott er at skilja millum eindarfiskidagar á eitt nú innaru og ytru leiðum, so hesir verða bjóðaðir á uppboði hvørjir sær, til tess at tryggja at veiðutrýstið verður javnað og øll økir verða gagnnýtt. Hetta vil m.a. gera, at prísurin á fiskidøgum á innari og ytri leiðum gerst ymiskur, alt eftir hvussu rentabul fiskiveiðan er á hvørjum øki[24]. Vit skyna tó ikki millum hesi bæði sløgini í víðari viðgerðini her.

***Fiskidagamarknaður Føroya***

Vit hugsa okkum, at stovnaður verður ein fiskidagamarknaður til tess at halda uppboðssølu við eindarfiskidøgum. Talan kann hóskandi vera um eitt partafelag. Endamálið hjá felagnum skal vera at selja teir eindarfiskidagar, ið ásettir verða av myndugleikunum sbrt. galdandi lóg um vinnuligan fiskiskap, á uppboði. Felagið kann antin

[23] Hetta er sjálvsagt ikki galdandi, fyri fiskirættindi ið eru latin ókeypis og uttan nakrar skyldur. Tá er tað altíð ein fyrimunur, at fáa hesi rættindi í so langa tíð sum gjørligt. Óvissan kemur í, tá rindast skal fyri rættindini.
[24] Sbrt. kunngerð nr. 94 frá 10.06.1996, kunnu fiskidagar á innaru fiskidagaleiðini umbýtast við fiskidagar á ytru fiskidagaleið við lutfallinum í fiskidøgum 1:3, so prísmunurin millum hesar leiðir er ikki ókendur.

skipast sum eitt privat partafelag, sum móti samsýning (provisión) útbjóðar fiskidagarnar á uppboði. Tað, ið kemur inn fyri fiskidagarnar, fer í Landskassan. Hinvegin kann tað eisini skipast sum eitt alment partafelag, har yvirskotið frá søluni av fiskidøgum fellur til landskassan sum vinningsbýti.

***Uppboðshátturin***

Lat okkum hugsa okkum, at tað t.d. er ásett, at loyvt er at fiska 45 tús. eindarfiskidagar í ár 2000[25]. Hesir kunnu t.d. útbjóðast soleiðis:

- 1. Ársfjórðing 9000 tús. eindarfiskidagar
- 2. Ársfjórðing 13500 tús. eindarfiskidagar
- 3. Ársfjórðing 9000 tús. eindarfiskidagar
- 4. Ársfjórðing 13500 tús. eindarfiskidagar

Tað nýtist soleiðis ikki at vera sama tal av eindarfiskidøgum í hvørjum tíðarskeiði; hetta kann eitt nú lagast eftir árstíðini, eins og tíðarskeiðið eisini kann setast til mánaðarliga, vikuliga ella árliga, alt eftir hvussu royndirnar við skipanini verða. Men útbjóðaða talið av eindarfiskidøgum í einum fiskiári eigur í mesta lagið vera tað, ið er ásett sum hægst loyvda eindarfiskidagatal.

Fiskidagamarknaðurin kann antin selja allar eindarfiskidagarnar fyri eitt ávíst tíðarskeið á einari einstakari uppboðssølu, t.d. við byrjan av tíðarskeiðinum, ella útbjóða eindarfiskidagar til sølu loypandi hvønn gerandisdag ella eitt nú ein fastan dag í hvørjari viku í tíðarskeiðinum[26]. Við loypandi sølu verður lættari hjá keyparum at laga keypið til tørvin, alt eftir árstíð, veðri, fiskiskapi v.m., so fiskidagar ikki verða keyptir uttan at koma í nýtslu[27].

Ein uppboðssøla fer fram á sama hátt sum tá t.d. danski Tjóðbankin selur "skatkamarprógv". Allir keyparar fáa fiskidagarnar til sama prís, sum verður ásettur á uppboðnum. Tey skip, einstaklingar ella virkir, ið ynskja at keypa fiskidagar, lata inn eitt boð, áljóðandi ein prís pr. fiskidag og hvussu stórt tal av fiskidøgum, ið ynskt verður at keypa til henda prísin. Tey kunnu eisini lata fleiri boð inn við ymiskum prísum, t.d. at tey vilja keypa:

[25] Tølini, ið nýtt vera í gjøgnumgongdini, eru ikki tikin úr núgaldandi skipan og hava einans til endamáls at lýsa, hvussu skipanin kann virka, og ikki hvussu nógvir fiskidagar skulu verða, ella hvussu møguligar nøgdir, prísir v.m. fara at verða í eini nýggjari skipan við fiskidagamarknaði.

[26] Aðrar skipanir eru eisini møguligar. T.d. at eindarfiskidagarnir vera galdandi fyri 2 mánaðir, men verða útbjóðaðir mánaðarliga. T.d. verða eindarfiskidagar galdandi í januar og februar útbjóðaðir í desember árið fyri, eindarfiskidagar galdandi í februar og mars útbjóðaðir í januar osfr. Samanlagt verður so tryggjað, at samlaða útboðið í árinum í mesta lagi svarar til hægst loyvda eindarfiskidagatalið.

[27] Royndirnar mugu vísa, hvørt tørvur er á, at hava møguleika at flyta keyptar fiskidagar til eitt nýtt tíðarskeið eftir einumhvørjum leisti, frá tíðarskeiðum, har ónormalt nógvir óveðursdagar (spilldagar) hava verið.

- 100 fiskidagar fyri 50 kr. hvønn
- 50 fiskidagar fyri 70 kr. hvønn
- 25 fiskidagar fyri 80 kr. hvønn

Boðini eru bindandi. Hevur eitt skip boðið sum omanfyri standandi, og prísurin verður t.d. 50 kr., má skipið keypa 175 fiskidagar (100 + 50 + 25) á 50 kr. Hevur tað ikki tørv á øllum hesum døgum, kann tað selja teir víðari.

***Prísásetingarhátturin á uppboðssøluni***

Tá øll boðini eru komin inn, verður talt saman hvør eftirspurningur er til hvønn prís. Lat okkum siga at 10.000 fiskidagar skulu seljast og innkomnu samantaldu boðini síggja soleiðis út:

| Kr. pr. fiskidag | Fiskidagar til hendan prísin | Samanlagt á/omanfyri prísin |
|---:|---:|---:|
| 100 kr. | 100 | 100 |
| 90 kr. | 700 | 800 |
| 80 kr. | 2.000 | 2.800 |
| 75 kr. | 3.000 | 5.800 |
| **70 kr.** | 4.200 | **10.000** |
| 65 kr. | 6.000 | 16.000 |
| 60 kr. | 8.500 | 24.500 |
| 55 kr. | 13.000 | 37.500 |
| 50 kr. | 20.000 | 57.500 |

Í vinstru kolonnu standa ymisku prísirnir, ið inn eru komnir. Í miðuni er lagt saman, hvussu nógvir fiskidagar boðini ljóða uppá samanlagt til hvønn einstakan prís. Í høgru kolonnu er so lagt saman, hvussu nógvir fiskidagar eru samanlagt til tann ávísa prísin ella omanfyri.

Dømi: Í vinstru kolonnu sæst 80 kr. Í miðkolonnuni sæst í somu linju 2.000 fiskidagar, sum merkir, at samanlagt er eftirspurningurin til júst 80 kr. 2000 fiskidagar. Í høgru kolonnu stendur talið 2.800. Tað merkir, at um prísurin gerst 80 kr., er eftirspurningurin samanlagt – t.e. tey ið bjóða 80 kr. ella hægri - 2.800 fiskidagar, ella 100 + 700 + 2000.

Sum tað sæst, verða 10.000 fiskidagar seldir samanlagt, um prísurin er 70 kr – nevniliga samlaða talið av fiskidøgum sum eftirspurningur er til fyri 70 kr. ella meira. Tískil verður prísurin 70 kr. pr. eindar-fiskidag, og øll sum hava boðið 70 kr. ella omanfyri fáa teirra boð nøktað og fáa teirra nøgd fyri 70 kr. pr. eindarfiskidag. *Øll fáa sostatt fiskidagarnar fyri sama prís.* Tey, sum hava boðið undir 70 kr., fáa ongar fiskidagar á hesum uppboðnum[28].

[28] Um eftirspurningurin til 70 kr., í døminum, í staðin fyri 4.200 fiskidagar hevði verið 6.000 fiskidagar, hevði samlaði eftirspurningurin til 70 kr. ella hægri verið 11.800 fiskidagar. Ein loysn á hesum er, at tey ið bjóðaðu meir enn 70 kr.

*Mest effektivu skipini fiska*

Við hesum uppboðssøluháttinum hava øll skip eitt incitament til at bjóða júst so nógv fyri fiskidagarnar, at marginalútreiðslurnar[29] (íroknað avskrivingar av vinnutólum og eitt normalavkast av ílagda peninginum[30]) svara til marginalinntøkurnar. Tvs. at um hesin prísur verður tann, ið uppboðið verður gjøgnumført til, hevur skipið onki "yvirnormalt" avkast. Er prísurin lægri, fær skipið meir enn eitt "normalavkast" av ílagda peninginum.

Lat okkum í einum nógv foreinklaðum dømi hugsa okkum, at prísurin fyri hvønn fiskidag á einum uppboði verður 70 kr. Tað merkir, at tey skipini, ið júst hava bjóðað 70 kr. hava samsvar millum marginalinntøkur og marginalútreiðslur til hendan prísin. Eitt skip sum hevur bjóðað t.d. 85 kr. fyri hvønn fiskidagin, fær sostatt vinningin millum 85 kr. og 70 kr. í egnan part, tí hetta skipið er meira effektivt enn tey ið bjóðaðu 70 kr. – jvb. At tað bjóðar 85 kr. Tað, sum hendir, er, at við 70 kr. eru 10.000 fiskidagar seldir sum ætlað. Tey skipini, ið fáa fiskidagar eru tey, sum fáa yvirskot við at geva 70 kr. fyri fiskidagin. Skip, sum ikki kunnu fáa yvirskot við 70 kr., fáa ongar fiskidagar. Tey høvdu jú fingið undirskot, – ella í hvussu so er ikki fingið eitt normalavkast av keypinum og sostatt ikki fingið forrentað vinnutólini - um tey rindaðu 70 kr. fyri hvønn fiskidagin. Sostatt verða hesir 10 tús. dagarnir troyttir av teimum mest effektivu skipunum[31].

*Umrokning av eindarfiskidøgum*

Gjørt verður eitt umrokningaryvirlit, ið sýnir, hvussu nógvir fiskidagar ein eindarfiskidagur kann umsetast til hjá hvørjum skipabólki sær. Hevur eitt skip í einum skipabólki, sum í løtuni er 50% meira effektivur enn tann bólkur, ið eindarfiskidagarnir taka støðið í (tvs. at veiðutrýstið er 50% størri enn hjá skipum í bólkinum sum eindarfiskidagarnir byggja á), keypt 100 eindarfiskidagar, kunnu hesir umsetast til 100% / 150% x 100 fiskidagar = 67 fiskidagar hjá hesum skipinum[32].

---

fyri fiskidagin fáa sínar dagar til 70 kr. meðan tey ið júst hava bjóðað 70 kr. fáa 4,8/6 partar av sínum boðið nøktað til 70 kr. Tann ið sostatt hevur boðið upp á 60 dagar til 70 kr. fær 48 dagar og samlaða sølan verður júst 10.000 fiskidagar. Ein onnur og kanska betri loysn er, at øll boð til 70 kr. ella meira verða minkað lutfallsliga líka nógv, t.e. at øll fáa 10/11,8 partar av sínum boðið nøktað, so seldir verða júst 10.000 fiskidagar. Tann, ið omanfyri bjóðaði upp á 60 dagar, fær sostatt 51 dagar.

[29] Marginalhugtakið tekur her støðið í, at eitt skip skal økja um talið av fiskidøgum so leingi væntaða inntøkan pr. fiskidag er størri enn útreiðslan pr. fiskidag.

[30] T.e. eitt avkast sum svarar til avkastið, ið kapitalmarknaðurin gevur, tá hædd er tikin fyri tí váða, sum fiskiskapur hevur í mun til arðar vinnur.

[31] At øll skipini hava eitt incitament til at bjóða soleiðis, at marginalinntøkur svara til marginalútreiðslur sæst av, at um skipið omanfyri t.d. hevði havt samsvar millum marginalinntøkur og marginalútreiðslur við 85 kr. og bjóðaði 65 kr., so hevði tað ongar fiskidagar fingið. Tað er ikki optimalt. Við at bjóða soleiðis, at marginalinntøkur svara til marginal-útreiðslur fær skipið altíð fiskidagar, um tað loysir seg at fiska, og tað verður ikki revsað við at geva rætta prísin til kennar í boðnum, tí tað fær dagarnar til sama prís sum øll hini skipini, ið fáa fiskidagar. Somuleiðis við øllum hinum skipunum á marknaðinum.

[32] Umrokning av fiskidøgum er heldur ikki nakað nýtt fyribrigdi, jvb. t.d. kunngerð nr. 70 frá 27. juli 1999 um lating av fiskidøgum. Umrokningarfaktorarnir eiga at verða broyttir við tíðini, alt eftir effektivitetinum á teimum ávísu skipunum,

***Yvirskotsdagar kunnu seljast víðari í tíðarskeiðinum***

Eindarfiskidagarnir kunnu, tá teir eru keyptir, frítt umsetast, eins og fiskidagamarknaðurin møguliga skal hava loyvi (men ikki skyldu) til at keypa teir aftur í fríari kapping við onnur. Hetta til tess at hava møguleika at afturkeypa fiskidagar, ið brúk ikki er fyri, til víðarisølu. Fiskidagar, ið ikki eru nýttir, tá tíðarskeiðið er runnið, detta burtur uttan víðari, uttan kompensatión til tann, ið hevur keypt teir – jb. definitiónina av eindarfiskidøgum sum amerikanska optión frammanfyri.

***Skiftistíð v.m.***

Ein so stór broyting sum omanfyristandandi, krevur eina ávísa skiftistíð. Fyri, at skiftistíðin skal vera so stutt sum gjørligt, talar, at jú fyrr skipanin kemur at virka, jú fyrr koma búskaparligu fyrimunirnir, ið ein rationalisering í fiskivinnuni hevur við sær. Hinvegin er neyðugt at skiftistíðin er long nokk til at vinnan fær høvi at tillaga seg og gagnnýta tær íløgur, ið longu eru gjørdar, innan karmarnar av og í tiltrúgv til verandi skipan.

Tíðarskeiðið til eina tilíka broyting kann neyvan finnast betri enn júst nú. Meginparturin av verandi fiskiskipaflota stendur ikki í stórari skuld, orsaka av saneringunum sum landið bar, fyrst í nítiárunum. Tann endurnýgging, ið stendur fyri framman, er bert møgulig um til ber at fullnýta nýggju og effektivaru skipini. Hesum letur skipanin við einum fiskidagamarknaði upp fyri. Men úrslitið verður, at talið av skipum minkar. Hetta merkir helst, at talið av teimum, ið koma at starvast innan fiskivinnuna kemur at minka, hóast t.d. virking umborð hálar hinvegin. Men arbeiðsloysið á landi er so at siga onki í løtuni. Í ávísum vinnum er tørvur á arbeiðsmegi. Hartil kemur, at alivinnan helst kemur at hava brúk fyri fleiri fólkum komandi tíðina, og ein komandi oljuvinna kann eisini skapa alternativar møguleikar fyri arbeiði á sjógvi og landi, hjá teimum, ið higartil hava starvast í fiskivinnuni.

Verandi fiskiloyvir hava tey flestu uml. 4 ár eftir av verandi skeiði, við tað at tey eru latin í 1994 fyri eitt 10 ára skeið[33]. Tá verandi loyvir ganga út í 2004, kundu tey fallið aftur til landið og verið bjóðað út aftur gjøgnum fiskidagamarknaðin.

Vit hugsa okkum, at skipanin verður sett í verk av álvara í 2004. Men tað hevur sera stóran týdning, hvussu treytirnar vera fram til 2004, til tess at vinnan ikki verður læst føst í verandi bygnaði, uttan møguleikar at tillaga seg. Fleiri møguleikar kunnu her hugsast. Eitt nú, at loyvt fullari umsetiligheit av verandi fiskiloyvum beinanvegin, men hesi skuldu bert verið galdandi fram til 2004, tá øll loyvir falla

---

men hetta er neyvan uttan praktiskar trupulleikar. Eisini eigur fiskidagatalið at lækkast so hvørt produktiviteturin hækkar, til tess at halda veiðutrýstinum á sama støði.

[33] Jb. løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, § 13. Ásetingarnar í §14 í somu lóg kunnu tó tulkast tann vegin, at eitt fiskiloyvi ið er umsett, harvið verður galdandi í eitt nýtt 10 ára skeið frá umsetningsdegnum. Hinvegin er heimild, sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, § 3 stk. 2, at taka hesi loyvi inn aftur.

aftur til landið. Hetta hevði skundað undir eina tillaging, við tað at tann ið t.d. selur sítt fiskiloyvi í 2000, fær ein ávísan prís fyri hesi rættindi, ið eru galdandi fram til 2004. Hetta kann eisini fatast sum eitt slag av endurgjaldi, fyri at geva rúm fyri øðrum.

Alternativt kundi verandi lóg um vinnuligan fiskiskap verði broytt soleiðis, at tey fiskiloyvi, ið ikki verða gagnnýtt í tíðarskeiðnum fram til 2004, falla aftur til landið, og harvið kunnu útbjóðast á fiskidagamarknaðinum[34]. Byrjast kann so í smáum við at selja fiskidagar, ið eru fallnir aftur til landið. Hetta kundi verið við til at bøtt um lønsemi í fiskivinnuni. Verður hendan loysnin vald, má tann ið hevur fiskiloyvi og ætlar at skifta skipið út við annað skip, kortini fáa loyvi til hetta, uttan at fiskidagarnir falla aftur til landið áðrenn 2004. Annars verður vinnan læst føst í verandi skipum komandi 4 árini, og tað hevði verið sera óheppið.

Eitt lagaligt skifti kundi verið, at skipanin byrjar av álvara í 2004, tá verandi fiskiloyvir ganga út og/ella verða tikin aftur, men fyrsta árið fær veiðuloyvishavarin ókeypis 75% av dagatalinum, sum var tillutað í 2003. Hini 25% verða so boðin út sum eindarfiskidagar um fiskidagamarknaðin. Í 2005 verður ókeypis dagatalið skert niður í t.d. 50% av tí upprunaliga, so 50% fara um fiskidagamarknaðin. Í 2006 fara 75% yvir marknaðin og loksins fara 100% yvir marknaðin í 2007.

Um lógin verður lýst í 2000, so veit vinnan, hvat hon hevur at halda seg til. Tað er helst drúgt arbeiði at evna skipanina endaliga til, gera neyðugt lógarsmíð, fáa felagið upp at standa, evna forrit v.m. til uppboðsskipanina, gera virkisgongdir og reglugerðir v.m., áðrenn hon kann roynast í verki, eins og upplæring og venjing má fara fram, so vinnan er før fyri at nýta skipanina.

### Nakrir eginleikar við uppskotinum um fiskidagamarknað

***Minkar um spekulatiónselementið***

Sum er, verða fiskiloyvi seld, sum um tey vóru galdandi í óavmarkaða tíð. Royndirnar vísa, at eftirspurningur er eftir fiskiloyvum til ein prís, ið ofta er fleirfalt virðið av sjálvum skipinum. Men sera stór óvissa er um "rætta" prísin av einum fiskiloyvi. Tað veldst um framtíðarvánirnar fyri: fiskiskap, fiskaprísir, hýruprosent, oljuprísir, prísin á fiskireiðskapi og aðrari útgerð og rentu, tøkniliga menning, kapping v.m. Mistekur ein seg í metingini av hesum vánum, kemur ein at rinda ov nógv ella lítið. Og tað er so at siga ógjørligt at meta um hesi viðurskifti við bert nøkulunda vissu frammanundan.

[34] Krevur m.a. broyting í §14 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Handil við fiskidøgum undir verandi skipan hevur soleiðis við sær eitt sera stórt spekulatiónselement, eins og tað bert eru tey, ið eru sera kapitalsterk frammanundan fara at hava møguleika at keypa. Við eindarfiskidøgum, ið bert galda eitt avmarkað tíðarskeið (ella stutttíðarkvotum), verður spekulatiónselementið og kapitalkravið munandi minni.

***Konjunkturútjavning eftir prísum***

Prísirnir fyri ein eindarfiskidag koma at ávirkast av fleiri faktorum. Tá nógvur fiskur er, fer prísurin á fiskidøgum upp, um færri fiskidagar eru til taks, enn eftirspurningurin er. Fer fiskaprísurin upp, hækkar prísurin á fiskidøgum eisini. Øvugt við lítlum fiskiskapi og lækkandi prísum. Tilsvarandi um útreiðslurnar til reiðskap, olju og rentur hækka. Tá verður yvirskotið minni, og harvið lækkar prísurin á fiskidøgum.

Sostatt kemur ein stutttíðar fiskidagamarknaður at føra til, at prísirnir á fiskidøgum hava eina ávísa konjunkturútjavning fyri fiskiflotan við sær.

***Kostnaðarminsti uppboðshátturin fyri fiskivinnuna***

Uppboðshátturin omanfyri er bíligari fyri tey, ið ætla sær at halda áfram í fiskivinnuni, enn um eitt nú selt var til hægstbjóðandi, sum er tann háttur, ið vanliga verður nýttur, tá privat selja. Tá hevði sonevnda “brúkarayvirskotið”[35] í hvussu so er partvís tilfallið teimum, ið selja, og ikki teimum, ið eru í vinnuni. Brúkarayvirskotið er her tann effektivitetsvinningur, ið mest effektivu skipini hava í mun til marknaðarprísin á einum effektivum marknaði.

Um umsetiligheit verður gjøgnumførd við at loyva verandi loyvishavarum at selja síni rættindi, verður tillagingin í vinnuni trekari, og útboðið av fiskidøgum munandi lægri enn undir fiskidagamarknaðarskipanini. Tískil vera prísirnir helst hægri og meira skiftandi, og ein størri partur av effektivitetsfyrimununum hjá teimum effektivastu skipunum fer at liggja hjá teimum privatu, ið selja, og minni partur hjá teimum, ið skulu keypa effektivu skipini og bera váðan.

***Miðsavnan***

Við einum fiskidagamarknaði sum omanfyri lýst, við ongum avmarkingum, fer tað at fara fram ein munandi rationalisering av fiskiflotanum. Væntandi vera fleiri størri skip enn í dag. Samstundis fara nógv skip ikki at standa seg í kappingini, og verða seld. Samlaði flotin verður tí minni. Men av tí at rentabiliteturin økist, fer vinnan at vera før fyri at endurnýggja seg sjálva, og hartil at geva eitt nøktandi avkast av tí kapitali, sum er settur í vinnuna – umframt avkast til landskassan av søluni av eindarfiskidøgum.

[35] Enska heitið er ”consumer’s surplus”.

Ein trupulleiki, ið er sæddur í verandi skipan, er, at bygdir missa skip og harvið fiskirættindini. Hesin trupulleiki fer at økjast í eini skipan við umsetiligheit, ið byggir á langtíðarrættindi. Hetta tí at kapitalkravið er sera stórt, samstundis sum tað ikki ber til at fíggja fiskidagar undir verandi skipan, jb. § 15 skt. 3, ið bannar veðseting. Gongdin í Íslandi vísir, at verður umsetiligheit innførd í verandi skipan við langtíðarrættindum, har ognarrætturin verður latin privatum, verður ikki møguligt hjá teimum pørtum av landinum, ið ikki hava kapitalsterkar fyritøkur ella persónar, at standa seg í kappingini um hesi rættindi.

Við einum fiskidagamarknaði verður hetta hinvegin neyvan ein trupulleiki, tí øll kunnu til eina og hvørja tíð keypa fiskidagar á fiskidagamarknaðinum, um tey leiga ella keypa sær skip og eru kappingarfør. Eydnast ikki at fáa fiskidagar á einum uppboði, er møguleikin til staðar á tí næsta. Fiskidagamarknaðurin tryggjar kapping og búskaparligan effektivitet, samstundis sum kapitalbyrðan at keypa rættindi verður lítil í mun til verandi skipan, og avlopið av handlinum fer í landskassan til gagns fyri allar landsins borgarar.

Uttan mun til hvør skipan verður vald, vil tað verða gagnligt fyri umsetiligheitina, at loyva veðseting av fiskirættindum[36].

***Uppskotið livir upp til intentiónirnar í lógini um vinnuligan fiskiskap***

Við hesum uppskotinum fellur tilfeingisrentan í Landskassan sum føroya fólks ogn og livir hon tískil upp til §2 stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Hartil kemur, at øll hava frælsa atgongd til at keypa sær fiskidagar á jøvnum føti, og livir skipanin tí eisini upp til ásetingina í §2 stk. 3 í somu lóg.

**Nakrir spurningar, ið eru áhugaverdir við eini skipan við fiskidagamarknaði**

***Fer at bera til at fíggja skip, uttan at hava trygd fyri fiskidøgum frammanundan?***

Eins væl og virkir verða fíggjað, uttan at rávøran er keypt frammanundan, ella trygd er fyri rávøruni í allari framtíð, so ber eisini til at fíggja skip, uttan at eiga fiskidagar. Tað, sum er altavgerðandi, er, at ein marknaður er fyri fiskidagar við vissu fyri einum støðugum útboði (sum tó kann hækka og lækka alt eftir lívfrøðiliga grundaðu ásetingini av fiskidøgum), og at tað er frí atgongd til henda marknað. Avgerðandi fyri um eitt skip kann fáa fígging verður – eins og fyri onnur virki – hvørt skipið hevur neyðug loyvir til at fiska (veiðuloyvi) og verður mett at bera seg í kapping við onnur skip á fiskidagamarknaðinum. Hetta er júst tað sama, sum er galdandi fyri okkara flakavirkir, ið keypa fisk á uppboðssølu.

[36] Krevur broyting í §15 stk. 3 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

***Hvussu kunnu verandi fiskiskip tryggja sær fiskidagar?***

Fiskiskip tryggja sær fiskidagar við at verða kappingarfør. Av tí at seldu fiskidagarnir bert eru galdandi fyri eitt stutt tíðarskeið í senn, verður ikki talan um stórar upphæddir, ið skulu fáast til vega at keypa fiskidagar fyri. Avgerðandi er tí ikki, at skipið hevur stórt gjaldføri, men at tað forrentar seg, so peningur verður til at rinda fyri fiskidagarnar. Tað ber soleiðis eisini til at fíggja fiskidagar (t.d. móti veð í fiskidøgum og veiðu) um tiltrúgv er til, at hetta gevur yvirskot fyri skipið.

***Skulu onnur enn skip kunna keypa fiskidagar?***

Mest smidligheit fæst í skipanina, um øll kunnu keypa fiskidagar. Harvið ikki sagt, at øll skulu hava loyvi at fiska – til tess krevst eitt veiðuloyvi frá Landsstýrinum. Men hugsast kann, at t.d. fiskasølur ella flakavirkir, sum hava langtíðarordrar kunnu keypa fiskidagar, sum tey so gera avtalur við skip um at fiska fyri seg. Hetta ger, at ein vertikal integratión kann fara fram í framleiðsluni, uttan at ognarrætturin nýtist at integrerast samstundis[37].

***Hvussu verður við prísinum á skipum, tá skip og fiskirættindi verða sundurskild?***

Í dag verða skip ofta seld við fiskiloyvum – t.d. rætti til ávíst tal av fiskidøgum. Orsøkin er, at um onki fiskiloyvi fylgir við, kann skipið ikki fiska, tí ongin onnur atgongd er til hesi avmarkaðu rættindi. Men sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, er ikki búskaparligt grundarlag fyri at rinda fyri fiskirættindi í longri tíð, enn eftir er sambært fiskiloyvinum hjá skipinum. Í øllum førum verða skip og fiskiloyvi í Føroyum í dag handlaði sum pakkaloysnir. Hinvegin, tá skip verða seld av landinum, er tað uttan fiskiloyvi, og prísurin avspeglar prísin á sjálvum skipinum sum so.

Við skipanini við fiskidagamarknaði, verða skip og fiskiloyvi sundurskild. Tískil fellur prísurin á pakkaloysnini (skip + fiskiloyvi), tí hann, sum skal fiska, skal framyvir rinda fyri fiskiloyvið yvir fiskidagamarknaðin, og ikki til tann, ið áttið gamla skipið. Sjálvt skipið verður tí ikki minni vert undir eini skipan við skilnaði millum fiskiloyvi og skip, men tann ið selur, fær onki fyri fiskiloyvið (ið ofta er størri parturin av søluvirðinum) framyvir. Undir einum fellur tí prísurin á skipi og fiskiloyvi. Hinvegin verða tey skip, sum í dag onki fiskiloyvi hava, meira verd, um tey skulu seljast á føroyska marknaðinum, tí tey nú hava atgongd til at fiska á jøvnum føti við onnur skip, bert tey hava veiðuloyvi.

Framyvir kemur eitt skip at hava tað virði, sum svarar til, hvussu effektivt tað er, og hvat tað kann vinna. Hetta fer at gera virksemið meira liðiligt, tí skipið nú er at roknað sum eitthvørt annað amboð, uttan nøkur fiskirættindi atknýtt. Ein reiðari kann skifta skip út, keypa fleiri skip ella leggja um til annan reiðskap, alt eftir hvat búskaparliga loysir seg.

[37] Vert er at geva gætur, at ásetingin um, at 30% av veiðuni skal um uppboðssølu (sbrt. kunngerð nr. 85 frá 18. oktober 1999), møguliga kann vera ein forðing hjá flakavirkjum ella fiskasølum, ið ynskja at keypa fiskidagar. Hesin spurningur er ikki neyvari viðgjørdur her.

| | |
|---|---|
| ***Hvussu sleppa nýggj fólk framat i fiskivinnuni?*** | Trupulleikin við verandi fiskidøgum saman við umsetiligheit er júst, at stórur kapitalur skal til fyri at keypa fiskirættindini. Hetta kemur at verða ein forðing hjá fólki, ið hava hug at royna seg í vinnuni, og hjá teimum, ið ynskja at økja um verandi virksemi. Henda trupulleika loysir ein fiskidagamarknaður, har fiskidagar bert verða seldir fyri eitt stutt tíðarskeið í senn. Við eini slíkari skipan vera krøvini til kapital at fara undir fiskivinnu við minni. T.d. ber til at leiga ein bát/skip og keypa fiskidagar fyri t.d. ein ársfjórðing og fara til fiskiskap. Fæst tað ikki at bera til, eru tapini munandi minni, enn um viðkomandi valdi (umframt skip) at keypa fiskidagar, sum eru galdandi fyri eitt langt tíðarskeið fram. Tað verður tí frælsari og minni váðið, at royna fiskiskap sum vinnuveg. |
| ***Er tað rímuligt, at tey sum eru í vinnuni, skulu gjalda fyri tey rættindi, ið tey hava í løtuni?*** | Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, er ognarrætturin Føroya fólks. Tískil hava fortreytirnar verið kendar, síðan lógin um vinnuligan fiskiskap varð sett í gildi í 1994. Tey, sum eru í vinnuni, koma undir nýggju skipanini væntandi at vinna meira, hóast tey rinda fyri rættindini – treytað av at tey eru kappingarfør við onnur, sum fara at ynskja at luttaka í fiskivinnuni. Hetta tí at skipanin kemur at rationalisera og effektivisera fiskivinnuna. Fortreytin fyri hesum er sjálvandi, at tað ikki verða lagdar óneyðugar bindingar á vinnuna, so hon fær høvi til at effektivisera. |
| ***Um tað verður frítt at royna, verða so ikki ávís økir trároynd og onnur ótroytt?*** | Til ber at tryggja, at tað loysir seg at royna á øllum økjum, við at býta fiskidagarnar upp eftir leiðum. T.d. ber til at selja fiskidagar á ytri og innari leiðum. Harvið verður prísurin á fiskidøgum á marknaðinum ymiskur, alt eftir hvussu nógv fæst burturúr einum fiskidegi. Onnur skynsom uppbýti kunnu møguliga finnast. Hinvegin er tað neyvan skilagott at gera ov nógv uppbýti av hesum slag. Umframt hesi uppbýti er helst framhaldandi neyðugt, at hava ávísar stongdar leiðir til tess at tryggja gýtingarstovnin og at halda reiðskap atskildan. |
| ***Um tað verður frítt at royna, verða so ikki ávís fiskasløg trároynd og onnur ótroytt?*** | Ein av veikleikunum í fiskidagaskipanini í mun til kvotur er júst, at trygd er ikki móti trároynd eftir dýrastu fiskasløgunum. Hesin veikleiki finst uttan mun til, um skipanin er umsetilig ella ikki. Til ber partvís at avmarka henda vansa við stongdum leiðum. Eisini vil ein uppbýting í ytri og innari leiðir vera við til at gera tað rentabult at royna eftir djúpvatnsfiskasløgum.<br><br>Alternativið til fiskidagarnar eru kvotur. Nógv kjak hevur verið um fyrimunir og vansar við kvotum. Í hesum uppskotinum verður tann spurningurin ikki viðgjørdur, men sum nevnt kann uppskotið eins væl nýtast við stuttíðarkvotum sum eindarfiskidøgum. |

## Víðari útlit

***Altjóða marknaðir***

Okkum vitandi, hevur onki land eina skipan, sum her er lýst. Men skipanin byggir á viðurkenda búskaparfrøði, soleiðis sum henda t.d. verður praktiserað á fíggjarmarknaðum kring allan heim. Hugsast kann, at um skipanin eydnast væl í Føroyum, fóru onnur lond at taka eftir henni. T.d. Ísland, Grønland og Noreg. Tá hevði kanska borið til at loyvt íslendingum, grønlendingum og norðmonnum at keypt á fiskidagamarknaðinum í Føroyum móti, at vit høvdu somu rættindi at keypa fiskidagar á einum líknandi góðkendum fiskidagamarknaði hjá teimum. Tá kann ein siga, at Føroyar aftur hevði verið í støðuni frá aðrenn fiskimarksavmarkingar, við møguleika at troyta allar leiðir, har vit hava kunnleika og eru kappingarfør. Hetta hevði ført til eina spjaðing av váðanum, við tað at fiskivinnan tá hevði havt fleiri bein at staðið á.

***Skipanarnevndin suveræn***

Ein møguleiki er, at skipanarnevndin kundi fingið fulla ábyrgd av at maksimera langtíðarútbýtið úr fiskidagamarknaðinum (t.e. verið suveræn í mun til politiska valdið). So hevði skipanarnevndin virkað eins og ein tjóðbanki, hvørs uppgáva oftast er at varðveita eitt "*stabilt pengevæsen*", uttan ov nógva inflatión – t.e. ein stabilan fiskiskap, sum maksimerar samfelagsliga avkastið av fiskivinnuni. Ein skuldi trúð, at tað er ein lívfrøðilig, og ikki ein politisk uppgáva, at áseta, hvussu nógv tað er lívfrøðiliga ráðiligt at fiska, til tess at maksimera búskaparligu úrtøkuna.

Hinvegin kunnu eitt nú ógvisligar skerjingar av fiskidøgum hava so stórar búskaparligar avleiðingar, at tað gerst ein politiskur spurningur, hvørt tað er ynskiligt at átaka sær vandan fyri niðurfiskking, heldur enn skerjingar her og nú.

## Útgangur

Sum nevnt í innganginum, er ætlanin við hesum uppskoti, at geva eitt boð uppá eina skipan, ið byggir á umsetilig fiskirættindi, og sum harvið tryggjar effektivitet og rentabilitet í vinnuni og fríari atgongd at fiska, samstundis sum ognarrættur og avkast, í tráð við lógina um vinnuligan fiskiskap, kemur øllum Føroya fólki til góðar. Ivaleyst hevur uppskotið onkur lýtir, men høvuðsprincippini við einum fiskidagamarknaði eru búskaparliga væl grundaði, og átti tí at kunna verið íblástur til víðari arbeiði við eini skipan við umsetiligheit. Eisini er vert at geva gætur, at uppskotið eins væl kann nýtast til stutttíðar kvotur sum eindarfiskidagar. Men uttan mun til, hvussu væl ein tílík skipan er tilevnað, so er altavgerðandi, at hon byggir á breiða politiska undirtøku og breiða undirtøku í Føroya fólki. Hetta vísa eitt nú royndirnar við kvotuskipanini, ið var undan fiskidagaskipanini.